| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 395 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 18. juni 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 142/25 – 176/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen (frá kl. 16:26)
Birgir Nielsen
Astrið Breckmann
Hildur Eyðunsdóttir

**LUTTÓKU EISINI:**
Fríður P. Dalsgarð
Eydna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Haraldsen og Anna Havmand

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 396 | |
| | Forkvinnunnar merki: | |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 142/25 | 25/06207-1 | Annita á Fríðriksmørk : Berst frá at møta á býráðsfundi 18. juni 2025 | 398 |
| 143/25 | 25/06208-1 | Høgni Vilhelmsen : Berst frá at møta á býráðsfundi 18. juni 2025 | 399 |
| 144/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 400 |
| 145/25 | 25/05181-4 | Viðtøkur fyri Eigarafelagið Berjabrekka tvey. | 402 |
| 146/25 | 25/05847-2 | Matr.nr. 1365x, Tórshavn. Umsókn um loyvi til víðarisølu av óbygdum grundstykki. | 404 |
| 147/25 | 25/05616-2 | Avtala við LGBT um skrúðgongu | 406 |
| 148/25 | 25/03407-1 | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis tørvur á hølum næstu tvey skúlaárin | 408 |
| 149/25 | 25/01675-1 | Viðgerð av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022 til 2025 | 413 |
| 150/25 | 25/02630-1 | Íbúðir, sum sosiala deild varðar av | 424 |
| 151/25 | 25/02214-5 | Djóraverndarfelagið : Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg - 17/02152 | 430 |
| 152/25 | 25/03897-1 | Alment WC á Hvítanesi | 436 |
| 153/25 | 25/04323-2 | Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.1 - 23/06318 | 439 |
| 154/25 | 25/05791-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025 | 442 |
| 155/25 | 25/06231-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624 | 446 |
| 156/25 | 25/02597-2 | Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu - 23/04346 | 449 |
| 157/25 | 25/01179-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377 | 454 |
| 158/25 | 25/00243-1 | Innkomuvegur – íbindingar o.a. - 23/03480 | 460 |
| 159/25 | 25/05665-1 | Heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung | 463 |
| 160/25 | 25/01086-2 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina | 467 |
| 161/25 | 25/01097-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy | 473 |
| 162/25 | 25/01107-4 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð | 477 |
| 163/25 | 25/05916-1 | Havnin sum súkklubýur - 19/01370 | 481 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 164/25 | 25/03442-1 | Raðfesting av konto 6177 - Umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk fyri 2025 | 484 |
| 165/25 | 25/05864-1 | Skráseting av 19 havleiðingum í Tórshavn | 489 |
| 166/25 | 25/05865-1 | Kanning og støðumeting av 700 m havleiðingini við Landssjúkrahúsið | 491 |
| 167/25 | 25/05866-1 | Kanning av verandi støðu á kloakkleiðing við Sjósavnið | 493 |
| 168/25 | 25/05867-1 | Skráseting og spuling av kloakkleiðingum í allari kommununi | 495 |
| 169/25 | 25/05868-1 | Kloakkarbeiði í Pedda við Stein gøtu | 497 |
| 170/25 | 25/05869-1 | Kloakkarbeiði á Heiðavegi | 499 |
| 171/25 | 25/05870-1 | Hosufóðring av kloakkleiðingum | 501 |
| 172/25 | 25/04246-1 | Ymisk arbeiði á Brennistøðini í 2025 - fíggjað av løgukonto 7175 renovasjón | 503 |
| 173/25 | 25/05804-1 | Skansabryggjan útbygging - loka verkætlan | 506 |
| 174/25 | 25/05453-1 | Uppskot til reglugerð fyri útlutan av raðhúsum | 509 |
| 175/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 511 |
| 176/25 | 25/00153-1 | Nýtt felagshús til FC Hoyvík og heildarætlan fyri økið - 23/05602 | 513 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 398 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

## 142/25 Annita á Fríðriksmørk : Berst frá at møta á býráðsfundi 18. juni 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 142/25 | 25/06207-1 |

**Málslýsing**
Annita á Fríðriksmørk hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Hildur Eyðunsdóttir, eru loknar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 143/25 Høgni Vilhelmsen : Berst frá at møta á býráðsfundi 18. juni 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 143/25 | 25/06208-1 |

**Málslýsing**
Høgni Vilhelmsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Astrið Breckmann, eru loknar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 400<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 144/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 120/25 | 25/00163-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 144/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

## 145/25 Viðtøkur fyri Eigarafelagið Berjabrekka tvey.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 126/25 | 25/05181-4 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 145/25 | 25/05181-4 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá Advokatfelagnum.

**Lýsing av málinum.**

Eigarafelagið hevur á ársaðalfundi samtykt viðtøkubroyting.

**Verðandi orðing í viðtøkum § 14 A. 2 reglubrot:**

*Felags viðlíkahaldið fevnir eisini um uttanveggja viðlíkahald av húsaklædningi, høvuðsdyr, vindeygu, herundir eisini máling uttan.*
*Húsini uttan v.m. verða málaði við ymiskum og sterkum litum, sum nærri ásett av Tórshavnar kommunu.*

**Nýggj samtykt orðing í viðtøkum § 14 A. 2. reglubrot:**

*Felags viðlíkahaldið fevnir eisini um uttanveggja viðlíkahald av húsaklædningi, høvuðsdyr, vindeygu, herundir eisini máling uttan av einstøku íbúðunum , tó so, at einstøku eigararnir av viðkomandi eigaraíbúðunum vera individuelt at bera kostnaðin fyri ta viðlíkahald uttanveggja tengt er at einstøku íbúðunum tá talan er um húsaklædning, høvuðsdyr, vindeygu, máling. Nýtsla, røkt og viðlíkahald av trappum upp til íbúðir í erva ávikavíst tilkemur og áliggur í felag eigarunum av viðkomandi íbúðum trappurnar eru uppgongd til og greiða hesir eigarar ikki hesa skildu sína, kann eigarafelagið lata arbeiðið gera fyri eigarans rokning. Húsini uttan v.m. verða málaði við ymiskum og sterkum litum, sum nærri ásett av Tórshavnar kommunu.*

Aðrar broytingar verða ikki framdar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Viðtøkur fyri Eigarafelagið Berjabrekka 2. Matr.nr. 1464d, Tórshavn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Viðtøkubroytingin umfatar einans í hvønn mun eigarar av eigaraíbúðunum skulu bera kostnaðin av viðlíkahaldi/umvælingum, og í hvønn mun eigarafelagið skal bera kostnaðin.

Sambært § 23, í viðtøkunum, eru viðtøkurnar tinglýstar sum servituttur á matr.nr. 1464d, Tórshavn. Átalurætt hevur eigarafelagið við nevndini og ein og hvør íbúðareigari umframt Tórshavnar kommuna.

Sambært aðalfundarfrágreiðing framgongur, at uppskotið varð einmælt viðtikið við øllum atkvøðum fyri. Annars verður viðtøkubroytingin mett so munandi inntriv at vera, at hon, umframt viðtøku á aðalfundi, eisini skal góðkennast av øllum eigaraíbúðareigarum og verður hetta samtykki nú innheintað frá øllum limum í eigaraíbúðarfelagnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Umsókn frá Advokatfelagnum, vegna eigarafelagið Berjabrekka 2, og sum servituttir tinglýstar viðtøkur fyri Eigarafelagið Berjabrekka 2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Treytað av, at eigarafelagið Berjabrekka tvey, fær loyvi til vega frá øllum limum í eigaraíbúðarfelagnum, mælir miðfyrisitingarstjórin til, at býráðið umvegis fíggjarnevndina góðtekur viðtøkubroyting.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 146/25 Matr.nr. 1365x, Tórshavn. Umsókn um loyvi til víðarisølu av óbygdum grundstykki.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 124/25 | 25/05847-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 146/25 | 25/05847-2 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur sent kommununi umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum. Matr.nr. 1365x, Tórshavn.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 1365x, Tórshavn.
Talan er um eitt grundstykki, sum táverandi móttakari av grundstykkinum í 1983, fekk tillutað, í samband við at kommunan gjørdi eina útstykkingarætlan fyri økið undir Brúnni millum Sundsvegin og Villingardalsvegin. Allir leigarar av traðunum fingu hvør sítt grundstykki, og fekk familjan tá útlutað stykkið nr. 22, og sum tá ið útstykkingin var liðug varð avhendað sum matr.nr. 1365x, Tórshavn. Endaligt skeytið var tinglýst 17.11.1983.

Í 2004, gav kommunan loyvi til, at táverandi eigari avhendi grundstykkið til sín hjúnafelaga.

Dóttur og versonur, núverandi eigara, skulu yvirtaka grundstykkið, har tey fara undir at byggja eini sethús.

Grundstykkið er álagt servitutt um 2 ára byggifreist, og um at eigari ikki hevur loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum.

Tað hevur verið vanlig mannagongd, at tá ið kommunan hevur ognartikið lendi til kommunalt endamál, hevur kommunan gjørt avtalu við eigarar/leigarar av lendinum, um at hesi fáa tillutað eitt kommunalt grundstykkið sum “ makaskifti “ fyri lendismiss. Í endaligu skeytunum, eru vanligir kommunalir servituttir tinglýstir, herundir servittuttir um byggifreist v.m, men hevur kommunan ikki gjørt hesar servituttir galdandi ímun til byggifreist, og hevur eisini loyvt víðarisølu av líknandi makaskiftisgrundstykkjum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstur servituttur í uppruna skeytinum frá 1983.

Innan 2 ár frá tí, at endaligt skeyti er tinglýst, skulu sethús vera bygd á stykkinum. Annars fellur stykkið aftur til seljarans móti, at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

Keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá advokati, um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum. Umsókn um byggiloyvi til sethús. Tinglýstur hjúnasáttmáli frá 2004. Tinglýstir servituttir frá 1983.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til at talan er um eitt makaskiftis grundstykki, mælir kommunustjórin til, at loyva víðarisølu av grundstykkinum matr.nr. 1365x, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 147/25 Avtala við LGBT um skrúðgongu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 80/25 | 25/05616-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 103/25 | 25/05616-2 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 147/25 | 25/05616-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um stuðul til Faroe Pride

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við árligu skrúðgonguna hjá LGBT verður biðið um at játta kr. 100.000 um árið í 3 ár.

Peningurin skal brúkast til at fíggja pall, ljós, ljóð og trygdartiltøk herundir samarittar og ferðslutrygdartiltøk v.m. í sambandi við skrúðgonguna hjá LGBT uppundir ólavsøku.

Gjørd verður trý ára avtala millum Tórshavnar kommunu og LGBT um at Tórshavnar kommuna í 2025, 2026 og 2027 veitir LGBT ein árliga stuðul á kr. 100.000 til omanfyri nevndu tiltøk í sambandi við árligu skrúðgonguna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/03205

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum

Tórshavnar kommunu og LGBT og at játta 100.000 kr. um árið í 3 ár av konto 5310 Mentanartiltøk o.a. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Dam Jensen og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum at játta stuðul.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við tilmælinum um at játta stuðul og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum um at játta stuðul.

Ein annar minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir í staðin til at endurnýggja gomlu avtaluna um stuðul.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen tekur undir við tilmælinum um at játta stuðul.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein og Astrið Breckmann, tekur ikki undir við tilmælium um at játta stuðul

Málið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

# 148/25 Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis tørvur á hølum næstu tvey skúlaárin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 36/25 | 25/03407-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.05.2025 | 66/25 | 25/03407-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 80/25 | 25/03407-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 89/25 | 25/03407-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 124/25 | 25/03407-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 148/25 | 25/03407-1 |

**Upprunin til málið**
Avgerð um at loyva trimum 1. flokkum í Sankta Frans fyri skúlaárið 2025/2026

**Lýsing av málinum**
Næmingar í 1. og 2. flokki í Sankta Frans skúla eru knýttir til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini.

Talið av innskrivaðum børnum er umleið 100. Sum er tveir 1. flokkar og tveir 2. flokkar.

Mest loyvda barnatal í frítíðarskúlanum er ásett til umleið 60 børn.

Starvsfólk og leiðsla hava gjørt sera nógvar tillagingar og funnið loysnir, sum tó ikki eru optimalar við atlit til námsfrøði, starvsfólkaskipan ella fíggjarligt skynsemi, fyri at rúma øllum næmingunum úr Sankta Frans skúla.

Í 2020 setti kommunan tvær fyribils lonir á fríøkið útsynningsmegin frá Badmintonhøllini. Ein samanseting av staðseting og støðd av hølum gera, at lonirnar vera ikki brúkar av frítíðarskúlanum longur.
Ein lítil barnagarðsbólkur fyri børn, sum hava tørv á einum øðrvísi stovnstilboði, brúkar lonirnar.

Tá tríggir 1 flokkar byrja í august 2025 verður barnatalið umleið 114 børn. Tað er upp ímóti tvífalt so nógv børn, sum bygningurin er mettur til at rúma.
At tað verður ein eyka flokkur afturat ger, at er átrokandi neyðugt at byggja frítíðarskúlan út, og hølini skulu standa klár í august 2025.

Mælt verður til at byggja fyribils lonir til 44 børn.

<u>Tørvslýsing</u>
Lonirnar skulu hava:
- Klædnaklivar til børn og starvsfólk
- Ves til børn og starvsfólk
- Køkur
- Eitt stórt alrúm/felagsrúm, og
- Eitt hóskandi tal av smærri rúmum t.d. samrøðurúm, goymslurúm, starvsfólkarúm, spælirúm til villari spæl, spælirúm til stilt spæl, verkstaðsrúm.

<u>Staðseting</u>

Við atlit til byggingin skal ganga skjótt og so fíggjarliga skynsamt sum til ber, verður mælt til, at lonirnar vera staðsettar á parkeringsbásunum, sum liggja upp til spæliplássið framman fyri frítíðarskúlan.

Uppskot til staðsetingin skal takast við tí fyrivarni, at umsitingin hevur ikki kanna um byggiloyvi og fyribils nýtsluloyvi verður latið. Umsitingin hevur somuleiðis ikki spurt seg fyri, um vit fáa loyvi til at inndraga neyðugu parkeringsbásarnar.

Kostnaðarmeting
Ein varisliga kostnaðarmeting er viðfest í málinum. Metingin er gjørd við støði í tørvslýsingingini í málinum. Metingin skal takast við fyrivarni, tí umsitingin hevur ikki kannað faktisku viðurskiftini á staðnum.
Eindarprísurin tekur útgangsstøði í kostnaðinum fyri líknandi (nýggj) modul, sum vóru keypt og sett upp í Havnadali til Spíran.
Ein annar møguleiki er at bjóða uppgávuna út, har tilboðsveitarar sjálvir koma við uppskotið til slag og góðsku av modulum. Møguliga kunnu brúkt modul skaffast í Føroyum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um fyribils lonirnar í ein útnyrðing úr Badmintonhøllini
Í 2020 vóru fyribils lonir settar upp á fríøkinum í ein útnyrðing úr Badmintonhøllini. Sambært byggiloyvinum, er talan um eitt fyribils loyvi sum er galdandi í 5 ár. Eftir 5 ár skal alt tað sum verður bygt takast burtur aftur, herundir eisini fundamentir, leiðingar o.a. og økið skal gerast sum tað var áðrenn. (sí mál nr. 20/03276-7)

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Bls. 19 í mannagongd um ásetan av barnatali í frítíðarskúlum í Tórshavnar kommunu (20/010095-2)
Byggiloyvi B2 (20/03276-7)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til, at mentamálanevndin samtykkir:

- at fáa til vega útbjóðingartilfar
- at bjóða arbeiðið út í avmarkað útboð sum heildararbeiðstøka, og
- at úrslitið verður lagt aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Samtykt at seta nýggjar lonir upp og koma aftur í nevnd viðvíkjandi fígging.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur fingið til uppgávu at finna eina staðseting til fyribilsskúrarnar, sum eftir ætlan skulu byggjast áðrenn skúlabyrjan august 2025.

Bygningsdeildin hevur havt fund við Byggimálsdeildina um byggiloyvi og staðseting av lonunum. Byggimálsdeildin hevur framleitt viðheftu myndir, sí j. nr. 25/03407-8, Fyribilshølir til frítíðarskúlan við Badmintonhøllina – Flatmynd og j.nr. 25/03407-8, fyribilshølir til frítíðarskúlan við Badmintonhøllina – Støðumynd.

Í hesum uppskotinum verður víst á eina staðseting á parkeringsplássinum vestan fyri skýlið við Ovara vøll. Byggimálsdeildin vísir á, at tey vilja mæla frá, at staðseta lonirnar á hesum stað og harvið taka 14 parkeringspláss, sum annars eru við til at nøkta tørvin til virksemið í Gundadali. Byggimálsdeildin vísir á, at tað í dag mangla uml. 100 parkeringspláss í mun til, hvat kravið ásetur, og mæla tey til, at onnur staðseting verður funnin.

Býarskipanardeildin hevur síðani hugt upp á økið í síni heild, og vísandi til at tað ikki er nógv pláss eftir at byggja á í Gundadali, so er tað ikki heilt líkatil at finna eina góða staðseting í mun til verandi virksemi hjá frítíðarskúlanum.
Staðsetingarnar, sum kundu verið møguligar eru:

- Økið norðan fyri Gundadalshøllina, millum Dansifrøði og Gundadalshøllina. Hetta økið er møguligt at byggja á, men krevst nakað av jørðarbeiði, fyri at byggingin kann lata seg gera. Staðsetingin er tó nakað langt burtur frá verandi virksemi og spælimøguleikum við Batmintonhøllina. Tað kann eisini hugsast, at virksemið ikki sær hesa staðsetingina, sum ein møguleika í mun til at reka virksemið á frítíðarskúlanum.
- Økið millum HB-húsið og B36-húsið. Hetta økið er óbygt, og verður ikki brúkt til tað stóra virksemið í dag, og tískil er møguligt at seta nakrar lonir á økið. Mett verður, at frástøðan til verandi frítíðarskúla ei heldur eigur at vera ein trupulleiki, tá frástøðan ikki er meir enn tað sama. Hugsast kann eisini, at henda staðsetingin upp á sigt kundi rúma einum framtíðar frítíðarskúla og klubbvirksemi fyri ung.

Serliga grundað á, at fyrra staðsetingin við Gundadalshøllina er so langt burtur frá verandi virksemi, so verður mælt til, at staðseta lonirnar við Ovara vøll, millum HB- og B36-húsið.

Tað er við sera stuttum skotbrái, at henda staðsetingin skuldi finnast, so møguleikarnir at hoyra B&U, sum varðar av frítíðarskúlanum, og grannarnar báðar, fótbóltsfeløgini HB og B36, hava ikki verið til staðar.

Tað er sera týdningarmikið, tá talan er um fyribils lonir/skúrar, at tað tá verður "fyribils", og ikki nakrar lonir, sum enda við at gerast varandi loysn fyri virksemið. Kommunan eigur alt fyri eitt at arbeiða fram ímóti eini endaligari varandi loysn fyri frítíðarskúlan, soleiðis at virksemið fær nøktandi karmar at virka undir, og soleiðis at økið ikki kemur at framstanda við fyribils loysnum og bygningsformum, sum ikki taka hædd fyri verandi bygging í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta fyribils lonirnar/skúrarnar við Ovara vøll, í óbygda økið millum HB-húsið og B36-húsið, og at málið verður beint í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt, at staðsetingin verður sambært tekning *jnr. 25/03407-10 Støðumynd – Staðseting á økinum hjá frítíðarskúlanum*, og at beina málið í Mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt nr. 80/25 frá 5. mai 2025 í Byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting til fyribils lonir.

Hetta mál snýr seg um at seta fyribils lonir upp við Badmintonhøllina, tí talan er um bráðfeingis tørv á hølum í samband við at ein eyka 1. flokkur verður tikin upp í Sankta Frans skúla eftir summarferiuna. Forskúlin í Sankta Frans heldur til í einari lon sum er staðsett í skúlagarðinum. Frítíðarskúlin deilir lonina við forskúlan. Hølisumstøðurnar í Sankta Frans eru ikki nøktandi, tí verður ikki mett, at tað ber til at staðseta ein frítíðarskúlaskúla í skúlanum. Tí verður mælt til at gera eina fyribils loysn við lonum við Badmintonhøllina, so børnini í 1. og 2. flokkum eru á sama matrikli.

Mentanmánanevndin hevur á fundi 12/3 samtykt at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina í mál nr. 25/03406 um at finna eina varandi staðseting til ein nýggjar frítíðarskúla til næmingar í 0.-2. flokk í Sankta Frans skúla.

**Fígging**:
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 5,5 mió. kr.

Øll játtanin á fíggjarætlanini 2025 til at dagføra Hoyvíkar skúla verður ikki brúkt í ár. Umsiting mælir til at 5,5 mió. kr. verða fluttar av løgukonto 4175 LK41013 “Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring” og til eina nýggja løgukonto sum er til verkætlanina at seta fyribils lonir við Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini.

Í komandi fíggjarætlan verður tí neyðugt at játta hesa upphædd til løgukonto 4175 fyri at verkætlanin at dagføra Hoyvíkar skúla kann halda fram ótarnað.

**Tíðarætlan**:
Umsitingin kunnar nevndina við eini tíðarætlan á næst komandi fundi.

Neyðugt verður leingja leigumálið við B36 til 1. og 2. flokk inntil fyribils lonirnar eru klárar at taka í nýtslu. Á §3 er játtað fígging til leigu av B36 húsinum fyri alt 2025, so neyðugt verður ikki við hægri játtan fyri restina av 2025, um partarnir leingja verandi leigusáttmála

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verkætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verkætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4175 | LK41013 | Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring | 3175 | | | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini -bráðfeingis hølir | 5.5 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til:

- At 5,5 mió. kr. verða fluttar av løgukonto 4175 LK41013 "Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring" til eina nýggja løgukonto "Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis hølir"

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

- At nevndin gevur umsitingin heimild til at samráðast við B36 um at leingja leigusáttmálan inntil fyribils lonirnar eru klárar at taka í nýtslu.

**Mentamálanevndin 07. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Høgni Vilhelmsen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti, vísandi til at peningurin verður tikin av játtanini til Hoyvíkar skúla.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, atkvøddu fyri at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi ímóti, og ongin atkvøddi blankt.

Málið var samtykt við 12 atvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, atkvøddu fyri at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi ímóti, og ongin atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari.

# 149/25 Viðgerð av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022 til 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.01.2025 | 6/25 | 25/01675-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 37/25 | 25/01675-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 149/25 | 25/01675-1 |

**Upprunin til málið**
Umsóknir verða viðgjørdar og lagdar fyri Trivnaðarnevndina til avgerðar á hvørjum árið tá fíggjarætlanin er samtykt og játtan avsett til útiøkini hjá skúlum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 er kr. 1 mió játtað til úttøkini hjá skúlum, og játtanin er býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Fløtum – fallundirlag | 130.000 |
| Skúlin á Fløtum – Guliskúli | 30.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 400.000 |
| Sankta Frans skúli | 290.000 |
| Velbastaðar skúli | 150.000 |

**Umsóknir um játtan í 2025**
Fimm umsóknir eru um játtan til útiøkini. Umsóknirnar eru hjálagdar.

<u>Sankta Frans skúli</u>
Søkt verður um játtan til skúlagarðarnar. Umframt Amerika eru tríggir skúlagarðar, og skúlin søkir um upphædd svarandi til 100 tkr. til hvønn garð, sostatt verður søkt um 300 tkr.

Í umsókníni stendur m.a., at miðdeildin hevur júst valt næmingaráð, og tey hava ikki
skipað seg enn, men ætlanin er, at næmingaráðið ger eina kanning, so næmingarnir fáa høvi at siga sína hugsan um skúlagarðarnar, og hvør tørvurin er. Skúlin fer saman við næmingaráðnum at gera eina ætlan at gera skúlagarðarnar áhugaverdar. Ætlanin er at skapa eitt spennandi og mennandi umhvørvi hjá næmingunum at ferðast í í fríkorterunum.

Lítligarður er garðurin hjá 1. og 2. flokki, og har er hugsanin at umvæla vøllin og asfalti og fáa ein klatrivegg á baksíðuna á fótbóltsvøllinum og góðkent undirlag framvið klatrivegginum.

Stórigarður er garðurin til 3. flokk og miðdeildina. Garðurin er eisini “parkeringspláss” hjá foreldrum sum fara í forskúlan við børnunum um morgunin. Asfaltið er slitið og tørvar umvæling, og málini eru illa farin, kanska tey kunnu umvælast um ikki, so mugu tey skiftast út. Økið millum báðar skúlarnar og við inngongdina í Willumsgøtu, er upplagt øki til annað enn bóltspæl. Tað er serliga har skúlin hugsar, at næmingaráðið skal siga sína hugsan um, hvat skal vera har.

Norðurgarður er garðurin hjá forskúlanum og 3. flokki. ætlanin er, at bóltvøllurin skal fáa undirlag, og at undirlag verður lagt við stóru steinarnar í garðinum, haraftrat er tørvur á útgerð til yngru næmingarnar t.d. smáar trampolinir og klatriveggur.

<u>Skúlin við Løgmannabreyt</u>
Skúlin fer at seta rennistrong upp og søkir um játtan at seta upp og at leingja Forðabreytina. Søkt verður um 300 tkr. til forðabreyt og uppseting.

<u>Eysturskúlin</u>

Skúlin hevur nú í nøkur ár útbygt útiøkið við játtan av upphæddini til útiøkir hjá skúlum, og søkir um 746.236,- kr til eitt punktstorn og eitt tresfit/parkur. Við í kostnaðarmetingini er eisini undirlag og uppseting.

Í umsóknini stendur um punktstornið, at tað er ætlað innskúling og miðdeild og skal setast upp í garðinum mótið Djóna í Geil gøtu. Spæliøkið í grøna økinum oman fyri Alonina verður nógv brúkt, og er ov lítið til øll børnini, so punktstornið fer at lætta um trýstið, sum er í spæliøkinum við A-lonina. Punktstornið er gott fyri grovmotorikkin hjá børnum, og tað er umráðandi at hava góðar møguleikar at mennast grovmotoriskt, tí gransking vísir,at grovmotorikkurin hevur stóran týdning fyri innlæringina hjá børnum.

Tresfit/parkur hevur sama týdning sum tornið, men er serliga ætlað næminginum í miðdeild og hádeild, Henda útgerð fer at lætta um hølisavbjóðingarnar í ítrótti. 15 næmingar kunnu gera venjingar á stativunum í senn. Nám X hevur tvær stórar breytir, har høvuðsinnihaldið er kropslig rørsla/avbjóðing. Í umsóknini stendur m.a.:"Eisini er hetta ein góður máti at flyta undirvísingina út og eggja næmingum til at venja og verða kropsliga virkin." Útgerðin kann verða brúkt í undirvísing, í fríkorterum og eftir skúlatíð. Spæliøkið í Eysturskúlanum verður nógv brúkt í frítíðini.

<u>Kollafjarðar skúli</u>
Skúlin søkir um 279.858,- kr. til skreiðubana, klintrivegg, klintrinet, stólpar og tog at ganga á. Ætlanin er at seta leikurnar upp í økinum millum skúlan og svimjihøllina.

Í umsóknini stendur m.a.:"Tað, sum vit hugsað, er at seta útileikur í eitt øki, har einki er, men har børnini eisini hava góðar umstøður at spæla. Málbólkurin hesaferð eru teir yngstu næmingarnir. Serliga hugsað vit um innskúlingina og forskúlan, sum skal byrja hjá okkum komandi skúlaár.

Av tí, at staðsetingin liggur ímillum skúlan og svimji- og ítróttarhøllina, vænta vit eisini, at tey verða mong, sum fara at fáa gleði av hesum útileikum, tá tey eru í økinum í øðrum ørindum, enn í skúla."

<u>Skúlin á Argjahamri</u>
Í sambandi við játtan á 400 tkr. í 2024 hevur býarskipanardeildin hjálpt við at gera eina heildarætlan og kostnaðarmeting fyri menning av útiøkinum. Kostnaðarmetingini fyri 3 øki er 4.493.950,- kr.

Øki 1. Multifótbóltsvøllur og parkour økið, øki 2 uppihaldstaður við kurvabóltvølli, bonkum og bálplássi og øki 3 náttúrulendi, sum bleiv lagt undir mold í sambandi við útbygging, ynski er um at fáa upprunaliga lendið fram aftur.

Um øki 1 skrivar skúlin i umsóknin m.a.," Nú Barnagarðurin á Hamrinum verður útbygdur, hevur kommunan valt at matrikkulera Fifa vøllin, sum skúlin hevur brúkt hvørt tað einasta fríkorter til barnagarðin. Hetta er ein stórur missur hjá teimum 150 næmingunum í miðdeild, sum hava brúkt vøllin dagliga síðan 2011. Vit meta eisini, at tað tíverri er eitt neiligt signal at senda út til næmingarnar hjá okkum, tá nú næmingaráðið í miðdeild hevur kempa fyri at fáa hegn runt um vøllin." Skúlin heitir á kommununa at gera eina íløgu í nýggjan vøll niðanfyri skúlan við Tváttá.
Kostnaðarmetingin er 3.5 mió. kr. Víst verður til mál 24/08100 og samtykt í trivnaðarnevndini 31. oktober 2024 at finna fígging á fíggjarætlanini 2025. Harumframt er ætlan um parkour økið á lítla grøna slættanum niðanfyri skúlan, men kostnaðarmeting fyri tann partin fyriliggur ikki enn.

Viðvíkjandi øki 2 arbeiðir skúlin saman við býarskipanardeildini og umboði fyri mentamáladeildina at gera økið vestanfyri skúlan brúkiligt. Arbeiðið er byrjað at gera ein kurvabóltsvøll uttanfyri høllina og at gera uppihaldsøki, bálstað og øki til smáar felagsveltur í grøna skráanum niðanfyri. Kostnaðarmetingin fyri økið 2 er góðar 300 tkr.

Øki 3 - í sambandi við útbyggingina av Høllini á Argjahamri varð hetta økið tyrvt undir í eyri, gróti og mold. Hetta var upprunaliga eitt náttúru vakurt stað við vøkrum og serstøkum hagagróti, og ynski er at

fáa vakra hagagrótið undan kavi aftur, so náttúran kemur aftur til sín rætt. Leyslig kostnaðarmeting at beina tilfarið burtur er 400 tkr.

<u>Skúlin á Fløtum</u>
Játtan á 130 tkr til at gera ábøtur á fallundirlag verður nýtt til endamálið. Byrja er við, at Hjálpirót hevur gjørt eina roynd at smyrja eyka lím á skaðar á fallundirlagnum, mett verður um, hvussu hetta riggar, áðrenn farið verður víðari. Nógvir skaðar eru á fallundirløgunum á spæliplássunum kring skúlan, so tørvur verður á framhaldandi ábótum og møguliga á útskiftan av fallundirlag.

Skúlin á Fløtum hevur ikki sent inn umsókn í ár, tí roknað verður við, at aðrir skúlar hava størri tørv. Skúlin hevur tó eina stigvísa heildarætlan fyri planting og kostnaðarmeting liggjandi fyri útiøkið, sum kann setast í verk um játtan er tøk til endamálið. Skjal nr. 21/04532-41

**Umsóknir i 2025 – upphæddir**
Upphædd u/mvg

| | |
|---|---|
| Sankta Frans skúli | 300.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 300.000 |
| Eysturskúlin | 746.236 |
| Kollafjarðar skúli | 279.858 |
| Skúlin á Argjahamri ? | |
| **Tilsamans (- SáAH)** | **1.626.094** |

**Uppskot um býti av játtan í 2025**
Upphædd við 6,25% mvg

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 185.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Endurnýggjan/viðlikahald | 143.000 |
| **Tilsamans** | **1.000.000** |

Uppskotið um býti av játtan var á skrá til fundin við skúlastjórar, sum var hósdagin 7. november 2024.

Skúlastjórarnir høvdu sum so ikki viðmerkingar til sjálvt býti av játtan, men ein gjørdi vart við, at gott hevði verið um, hvør skúli hevði eina játtan á uml. 50 tkr. sum var til viðlíkahald ella endurnýggjan av t.d. bonkum og borðum, at mála spøl í garðin og smærri viðlíkahald. Haraftrat varð víst á, at nú byrja fallundirløg at slítast, og tey kosta nógv, so játtanin til endurnýggjan viðlíkahald kundi verið hægri.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er 1.000.000,- kr. settar av á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá skúlum. Uppskot og tilmæli eru við tí fyrivarni, at 1.000.000,- kr. verða játtaðar á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá skúlum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 416 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Loka mál fyri undanfarnu býráðssetu: 21/04532

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | | |
|---|---|---|
| PDF | Umsókn um játtan til útiøki við Kollafjarðar skúla.msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn spæliøkið Eysturskúlin .msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn til útiøki.msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn vv útiøki Skúlin á Argjahamri.docx | 30.10.2024 |
| PDF | Umsókn til útiøki 2024.pdf | 17.10.2024 |
| PDF | umsókn spæliøkið Eysturskúlin 2024.pdf | 11.10.2024 |
| PDF | 0558_001.pdf | 11.10.2024 |
| PDF | Spælipláss í Kollafirði.pdf | 17.10.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 4175 | | Dagføring av skúlum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 4175 | LK 41019 | Skúlar, uttanumøki | |

| **Upphædd** |
|---|
| 2.000 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |

| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |
|---|---|---|

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta 1.000.000,- kr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini í 2025, og at játtanin verður býtt sambært uppskotinum omanfyri.

**Trivnaðarnevndin 28. november 2024:** Útsett.

**Ískoyti:**
Nú fíggjarætlanin fyri 2025 er samtykt, er greitt, at 2 mió kr. eru settar av á 4175 Dagføring av skúlum til útiøkini hjá skúlum. Umsitingin hevur tí dagført uppskotið um býti av játtan. Uppskotið var á skrá til fundin við skúlastjórar, sum var hósdagin 5. desember. Skúlastjórarnir høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

**Dagført uppskot um býti av játtan í 2025**
Upphædd við 6,25% mvg

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Broytingarnar í dagførda uppskotinum eru, at játtanin til Eysturskúlan og játtanin til endurnýggjan/viðlíkahald eru hækkaðar, og at játtan er til Skúlan á Argjahamri.

<u>Eysturskúlin</u>
Eysturskúlin søkti um játtan til punktstorn, ið er ætlað grunddeild og miðdeild og skal setast upp í garðinum móti Djóna í Geil gøtu. Haraftrat søkti skúlin um tresfit/parkur til mið- og hádeild, kostnaðarmetingin fyri tað er 185 tkr. kostnaðarmetingin fyirð punktstornið er 609 tkr. upphæddirnar eru við 6,25% mvg. nú játtanin til útiøkini er hækkað verður mælt til at játta 609 tkr. til punktstorn til útiøkið hjá Eysturskúlanum.

<u>Skúlin á Argjahamri</u>
Í fíggjarætlanini fyri 2025 er játtan ikki sett av til multivøll til Skúlan á Argjahamri, tí verður mælt til at játta 519 tkr. til lítlan sparkivøll í Skúlan á Argjahamri, sum eftir ætlan verður staðsettur omanfyri skúlan. Hesin vøllur verður so til børnini í grunddeild og frítíðarskúla. Hóast upphæddin ikki er nóg høg til liðugt gerð av einum sparkivølli, er hon væntandi nóg mikið til at gera lendisarbeiðið, asfalt og seta girðing um vøllin. Sparkivøllur við grúsi/asfalti og girðing kann takast í nýtslu, og so ber til seinni at taka støðu til, hvat undirlag skal vera á vøllinum, og møguliga finna fígging til undirlag og álegging í 2026.

Plássið omanfyri skúlan er ikki stórt, og fyrispurningur er sendur Býarskipanardeildini um avbjóðingar eru við plassi til lítlan sparkivøll og matrikumarkið millum skúlan og útstykkingina omanfyri.

<u>Endurnýggjan/viðlíkahald</u>
Sum víst varð á á fundinum við skúlastjórar hósdagin 7. november 2024, eru fallundirløg við at slítast. Haraftrat eru neyðugur ábøtur á undirlag í Skúlanum á Fløtum. Mett verður neyðugt at hava eina hægri játtan til endurnýggjan og viðlíkahald, tí er upphæddin í dagførda uppskotinum hækkað til 200 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta 2.000.000,- kr. av 4175 dagføring av skúlum, og at játtanin verður býtt sambært uppskotinum omanfyri

**Eyka trivnaðarfundur 17. December 2024:** Avlýstur

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin hevur umvegis teldupostsamskifti j.nr.21/04532-60 til 64 lagt málið fyri nevndarlimirnar og hevur nevndin tikið undir við málinum. Svarskriv eru síðani send umsøkjarunum fyri ársskifti.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at staðfesta avgerðina hjá undanfarnu Trivnaðarnevnd

**Trivnaðarnevndin 16. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:** Tørvur er á at gera umraðfestingar av játtanum til útiøkini hjá Sankta Frans skúla og Skúlanum á Argjahamri.

Útiøkið hjá Sankta Frans skúla:

Í 2025 er játta 212 tkr. av staðnummar 4175 til útiøkir í skúlagarðinum.
Í 2024 er játta 290 tkr. av staðnummar 4140 til spæliplássi Amerika (Ikki til avvatning)
Í 2023 er játta 83 tkr av staðnummar 4140 til spæliplássi Amerika (avvatning)
Íalt er játta 585 tkr. og einki er brúkt enn.

Størsta ynski hjá skúlanum er at fáa gjørt nakað við Amerika, tí har eru teir mest spennandi spælimøguleikarnir.

Skúlaleiðslan hevur saman við umboðum frá mentamáladeildini, bygningdeildini og býarskipanardeildini verið á staðnum og umrøtt møguleikarnar. Stóra avbjóðingin er avvatning á spæliøkinum og av vátlendinum omanfyri spæliøkið. Fyrr enn hesin trupulleikin er loystur er ikki ráðiligt at gera stórvegis við undirlagið við útileikurnar á spæliplássinum. Á spæliplássinum er dren lagt oman ígjøgnum lendi og frárensl, men har skal drenast vøl betur og leggjast náttúru undirlag undir leikur har mest slit er. Býarskipanardeildin umhugsar eina loysn har demma verður við einum garði millum spæliplássi og vátlendi, har grava og steinsett verður fyri einum hyli í vátlendinum og lendi hampa rundanum, so vátlendi eisini verður eitt hugnaligt umhvørvið. Avtala var at arbeiða fram ímóti eini felags verkætlan fyri avvatning.




Mentamáldeildin mælir til at játtanin frá 2024 á 290 tkr. verður umraðfest, so 370 tkr er til avatning av spæliplássinum Amerika til eina felags verkætlan fyri avvatning í økinum.

Mentamáldeildin trýstir á býarskipanardeildina um teirra møgulleika og vilja at raðfesta fígging til avvatning av vátlendinum.

Útiøkið hjá Skúlanum á Argjahamri:
Í 2025 er játta 519 tkr. av 4175 til sparkivøll til grunddeildina/frítíðarskúlan
Í 2024 er játta 400 tkr. av 4140 til kurvabóltsvøll og uppihaldsstað
Samlaða játtanin er soleiðis 919 tkr.

Av játtanini á 400 tkr. er brúkt 53 tkr. og avtala er við bygningsdeildina um at bjóða lendisarbeiðið út fyri báðar verkætlanirnar.

Bygningdeildin metir at lendisarbeiðið verður kostnaðamiklari enn mett í kostnaðarætlanunum sum liggja til grund fyri játtanunum. Skúlaleiðslan boðar tí frá, at tørvurin á at útbyggja skutaraskúrin fyri 200 tkr (játtan frá trivnaðarnevndini av 4140 j.nr. 24/01464) ikki er so stórur sum undanfarin ár og at tað er

týdningarmiklari fyri trivnaðin hjá næmingunum at raðfesta útiøkið, tvs sparkivøll, basketvøll og upihaldstað.

Mentamáladeildin mælir tí til at broyta samtyktina um játtan á 200 tkr. til skutara skúr og raðfesta játtanina til úti økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4140 | 41534 Spælipláss Amerika (ikki avvatning) | Ætlanir á skúlaøkinum | 4140 | 41534 Spælipláss Amerika (avvatning) | Ætlanir á skúlaøkinum | | 290 tkr. |
| 4140 | Útbygging av skutaraskúri | Ætlanir á skúlaøkinum | 4140 | 41533 Skúlin á Argjahamri (útiøkið) | Ætlanir á skúlaøkinum | | 200 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at:

- at játtanin frá 2024 til útiøkið hjá Sankta Frans á 290 tkr. verða umraðfestar, so 373 tkr. (játtan frá 2023 og 2024, sí undir ískoyti) er til avvatning av spæliplássinum Amerika til eina felags verkætlan fyri avvatning í økinum, og

- at broyta samtyktina í mál 24/01464 um 200 tkr, til útbygging av skutaraskúri, til at játta tær 200 tkr. afturat til úti økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tørvur er á at staðfesta samtyktina hjá trivnaðarnevndini 16. januar 2025,har býti av íløgujáttnini á 2 mio kr í 2025 til útiøkir hjá skúlum var deilt út til verkætlanir á fylgjandi skúlum:

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 421<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | |
|---|---|
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Íløgujáttanin hevur áður verið rakstrajáttan á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum við 1 mío. kr. árliga, men er í 2025 flutt á íløgukontu 4175 og hækkað til 2 mó kr.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4175 | | Dagføring av skúlum | 4175 | LK 41019 | Skúlar, uttanumøki | | 2.000 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tørvur er á at staðfesta samtyktina hjá trivnaðarnevndini 16. januar 2025,har býti av íløgujáttnini á 2 mio kr í 2025 til útiøkir hjá skúlum var deilt út til verkætlanir á fylgjandi skúlum:

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Íløgujáttanin hevur áður verið rakstrajáttan á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum við 1 mío. kr. árliga, men er í 2025 flutt á íløgukontu 4175 og hækkað til 2 mó kr.

Det sammenkædede billede kan ikke vises. Filen er muligvis blevet flyttet, omdøbt eller slettet. Kontrollér, at linket peger på den korrekte fil og placering.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at samtykkja íløgubýti og at leysgeva 2 mió kr. av konto 4175 á nýggja prosjekt konto undir § 4 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin í telduposti 16. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tørvur er á at staðfesta samtyktina hjá trivnaðarnevndini 16. januar 2025,har býti av íløgujáttnini á 2 mio kr í 2025 til útiøkir hjá skúlum var deilt út til verkætlanir á fylgjandi skúlum:

| | |
|---|---:|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Íløgujáttanin hevur áður verið rakstrajáttan á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum við 1 mío. kr. árliga, men er í 2025 flutt á íløgukontu 4175 og hækkað til 2 mó kr.

Det sammenkædede billede kan ikke vises. Filen er muligvis blevet flyttet, omdøbt eller slettet. Kontrollér, at linket peger på den korrekte fil og placering.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at samtykkja íløgubýti og at leysgeva 2 mió kr. av konto 4175 á nýggja prosjekt konto undir § 4 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin í telduposti 16. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Málið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

## 150/25 Íbúðir, sum sosiala deild varðar av

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.02.2025 | 11/25 | 25/02630-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 08.05.2025 | 27/25 | 25/02630-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 42/25 | 25/02630-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 104/25 | 25/02630-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 150/25 | 25/02630-1 |

**Upprunin til málið**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á sosialu deild og deildarleiðarin á bygningsdeildini ynskja at fáa mál á skrá til kunning á komandi trivnaðarnevndarfund.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna eigur 28 íbúðir, sum sosiala deild varðar av á tann hátt, at tað er sosiala deild, sum umsitur og visiterar borgarar til íbúðirnar. Tað er bygningsdeildin, sum hevur ábyrgd av viðlíkahaldinum og raðfesting av fígging til tann partin.

Fleiri av borgarunum hava búð í hesum íbúðum í nógv ár, men eru eisini íbúðir, har borgarar búgva í styttri tíðarskeið. Tá tey flyta út, skulu íbúðirnar dagførast, og fleiri av teimum eru í so ringum standi, at tørvur er á eyka fíggingin.

Tørvur er á:
- At lýsa standin á íbúðunum
- At gera eina kostnaðarmeting av hvat tað kostar at dagføra íbúðirnar
- At gera eina skrivliga lýsing av tørvinum hjá borgarunum
- At gera eina skrivliga leiðbeining (visitatión, leigusáttmála o.a.)
- At endurskoða húsaleiguna

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Viðheft skjal har yvirlit yvir íbúðirnar eru.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla til at málið um sosialu íbúðirnar og tørvin verður kannað og lýst nærri.

At málið kemur aftur í Trivnaðarnevndina til støðutakan tá málið er lýst.

**Trivnaðarnevndin 13. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyristandandi, so hevur Trivnaðarnevndin samtykt at málið um sosialu íbúðirnar verður kannað, umframt at tørvurin av sosialu íbúðunum verður lýstur. Omanfyri verður lýst núverandi gongd í málinum.

Bygningsdeildin
Bygningsdeildin er farin í eina tilgongd, har allar íbúðirnar verða screen'aðar, bæði innan og uttan og verður eitt skjal útfylt í hesum sambandi. Á henda hátt fær man eina lýsing av núverandi standi, og um íbúðirnar lúka/ikki lúka neyðug krøv. Arbeiðið verður væntandi liðugt í juni 2025. Kostnaðarmetingin fyri viðlíkahald / dagføring eigur eisini at leggjast afturat, soleiðis at støða kann takast til, um tað loysir seg at dagføra íbúðirnar ella um annað skal gerast.

Um tað eru íbúðir / bygningar, har tað verður mett, at tað fíggjarliga ikki loysir seg at varðveita, so skal tað eisini lýsast.

### Sosiala deild
Í verandi løtu verður ein skrivlig leiðbeining gjørd, har tað verður hugt eftir undanfarnum vegleiðingum hjá kommununi, umframt við íblástri frá leiðbeiningum hjá Almannaverkinum í smb. við sosialu íbúðirnar tey varða av í samstarvið við Bústaðir. Tað er umráðandi at tað liggur ein dagførd leiðbeining.

Tað eru 28 íbúðir, og tað er javnan at borgarar í Tórshavnar kommunu seta seg í smb. við Sosialu deild, tí tey ynskja at verða skrivaði upp og/ella tosa um møguleikan fyri at kunna leiga eina íbúð. Í teimum flestu íbúðunum hava leigararnir búð í nógv ár, nøkur størsta partin av teirra lívi. Síðani eru tað nakrar íbúðir, sum hava verið tøkar okkurt tíðarskeið, og tá eru tað ofta stakir uppihaldarar við børnum undir 18 ár, sum hava fingið íbúðirnar. Talan er eisini um borgarar, sum kunnu skrivast upp til sosialar íbúðir í Almannaverkinum.

Í løtuni er ein íbúð í Lon, sum hevur staðið tóm síðani heystið 2023. Uppskot eru gjørd um dagføring av íbúðini, men er talan um eina upphædd á áleið 1,5 – 2 mió, og manglar játtan til hetta. Tað er umráðandi at íbúðin verður dagførd, men støða skal takast til, um dagføringini er ein partur av einari samlaðari

dagføring av íbúðunum í Lon, ella um hetta er ein dagføring, sum verður gjørd nú, og so verða sosialu íbúðirnar dagførdar ein og ein, sum fólk flyta út.

**Ynskir frameftir**
Afturat teimum borgarum yvir 18 ár, sum hava tørv á sosialum íbúðum, so setur Barnaverndartænastan (BVT) javnan fyriskipanir í verk, har man stuðlar ungum undir 18 ár eftir *lóg um barnavernd §15, stk. 1, nr. 11) Veita stuðul til barn, 16 ár ella eldri, í egnum kamari ella egnari íbúð.*

Samlað eru 396 aktiv mál í skipanin hjá BVT, 96 av teimum eru ung yvir 16 ár. Síðstu 12 mðr. hevur BVT játtað fíggjarligan stuðul eftir §15, stk. 1, nr.11 til til 16 ung, samlaða upphæddin fyri hetta er 595.305kr. Talan er um húsaleiga fyri kømur og íbúðir, sum verða leigaðar bæði privat og gjøgnum fyritøkur (t.d. Mark), eins og nøkur leiga kamar inni í heimum hjá familjum. Onkuntíð eydnast fyriskipanin væl, men tað eru eisini neiligar royndir, tí tað eru fleiri viðurskiftir, sum skulu vera til staðar fyri at ein slík fyriskipan skal eydnast.

Tá ung fara út at leiga, so er tað oftast tí, at tey ikki kunnu verða búgvandi heima hjá sínum foreldrum. Tey eru ov gomul og/ella ynskja ikki at blíva umsorganaryvirtikin, og tí er hetta ein møguleiki at stuðla teimum í at koma burtur frá umstøðum, sum ikki verða mettar nøktandi. Afturat stuðlan til húsaleigu, so er umráðandi at seta aðrar fyriskipanir í verk, sum kunnu stuðla hesum ungum í teirra trivnað og menning. M.a. seta stuðlar/mentorar, sum kunnu vegleiða hesi ungu til hvussu tey skipa eina dag, læra at halda hús, reingerð, søkja arbeiði, søkja inn á miðnám o.líkn. Umframt stuðla teimum í sambandinum við foreldur/familjuna á ein jaligan hátt, og hesir stuðlar hava ofta eisini samband við foreldrini hjá hesum ungu.

Hyggja vit rundan um okkum í Norðanlondum, so er vanligt at kommunur hava bútilboð til hesi ungu millum 16-20 ár, har námsfrøðingar eru knýttir at við tí endamálið at stuðla teimum í at trívast, mennast og gerast klár til vaksnamannatilveruna. Bútilboðið er eitt heim, har tey eru áleið fýra ungu, sum búgva saman og hava ein gerandisdag, har tey eru partur av einum jaligum felagsskapið og hava atgongd til vaksin, sum kunnu vegleiða og ráðgeva í lívsins viðurskiftum.

Hetta er eitt tilboð, sum avgjørt átti at verið stovnað í Tórshavnar kommunu, og átti at blivið partur av arbeiðinum við sosialu íbúðunum. Tí á henda hátt fær kommunan arbeitt fyribyrgjandi og stuðla ungum, sum ikki hava eins góðar treytir í lívinum, sum onnur javnaldrandi í, at tey eitt nú fáa fólkaskúlaprógv, kunnu koma inn á miðnám og/ella út á arbeiðsmarknaðin og har við megna at standa á egnum beinum.

**Næsta stig**
Í verandi løtu verða screeningar gjørdar av øllum íbúðum, soleiðis at tað gerast greitt hvørjum standi íbúðirnar eru í, hetta verður væntandi lagt fram fyri Trivnaðarnevndina í juni 2025. Sosiala deild heldur á fram við at gera eina skrivliga leiðbeining, umframt eina týðiliga lýsing av málbólkunum, sum mett verður at íbúðirnar skulu tilskrivast. Her verður dentur lagdur á tey eldur, stakir uppihaldara við børnum undir 18 ár, og so at nakrar íbúðir og/ella hús verður sett av til ung millum 16-18 ár, sum ikki kunnu búgva heima orsaka av heimligu viðurskiftunum.

Tørvur er eisini á at hoyra hvørjar hugsanir býráðið hevur til sosialu íbúðirnar, og hvat skal takast við til víðari arbeiðið hjá fyrisitingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini at umrøða málið um sosialu íbúðirnar.

**Trivnaðarnevndin 08. mai 2025:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Á trivnaðarnevndarfundinum t. 08/05-25 varð niðurstøðan av screeningunum av sosialu íbúðunum í Tórshavnar kommunu løgd fram. Screeningin vísti, at íbúðirnar eru í ymsum standi, men meirilutin av sosialu íbúðunum lúka

ikki krøvini í smb. við brunatrygd. Á trivnaðarnevndarfundinum varð umrøtt og dentur lagdur á, at trygdin skal koma uppá pláss, harafturat skal støða takast til hvørjar íbúðir skulu varðveitast, og um tað eru íbúðir, har ein ætlan fyri avvikling skal gerast. Borgarar búgva í øllum íbúðum, og verður mett at nakrar íbúðir ikki skulu varðveitast, so skulu hesir borgarar koma í annan bústað. Í smb. við gjøgnumgongdina av íbúðunum vóru tað eisini íbúðir, har mett varð at leigarin átti at fingið bjóðað vegleiðing um aðrar tænastur, tí tað sást avbjóðing í m.a. at halda hús.

Ætlanin skal væntast at fevna yvir eitt tíðarskeið á 2-5 ár. Ætlanin fyri økið er at endurskoða verandi sosialar íbúðir, og miðja eftir at nøkta tørvin hjá ávísum málbólkum, sum eru lýstir omanfyri. Tað eru m.a. ung í aldrinum 15-18 ár, sum eru á gáttini til vaksna lívið. Tørvurin er mettur til at vera ein ella tveir búfelagsskapir við tilsamans 4-6 kømrum og felagsøki, og síðani útslúsing til egnan bústað, til endamálið kundu nakrar íbúðir í Lon verði nýttar til hetta í eitt ávíst tíðarskeið. Við at kunna veita ungum eitt námsfrøðiligt tilboð saman við einum bústaði, hevði avgjørt økt um møguleikar í smb. við íverksetan av fyriskipanum, sum tørvur er á.

Ætlanin inniber eisini at fimm sethús: Kannuberg, Yvirlærarahúsi, Skræddaragøta, Kjælneshúsini og Læknahúsið í Nolsoy møguliga verða seld. Møguliga kann eitt ella tvey av teimum umbyggjast til omanfyrinevnda búfelagskap. Sølurnar av sethúsum eiga at innganga í fíggingina av búfelagsskapum og umvælingum av íbúðum.

Í fyrsta umfarið verður mett at hendan ætlan er kostnaðarneutral í mun til at fáa neyðugu hølini til vega. Alt eftir hvussu tað gongur at visitera íbúgvar aðrar vegir kann ætlanin taka 2-5 ár at gjøgnumføra.

Ætlanin eigur eisini at fevna um eitt samstarv um inspektión og reingerð sum Bygningsrakstur kann standa fyri, og umsorganarvitjanir í íbúðum og stuðlar í búfelagsskapum, sum Sosiala Deild kann standa fyri. Ein slík tænasta merkir, at tað er neyðugt at uppnormera raksturin á báðum deildum.

Afturat hesum skal skal tað liggja ein dagførd leiðbeining har greiðar mannagongdir er fyri eitt nú leigusáttmálum, visitering, árligt uppsýn, húsaleigu o.líkn.

Tað eru tilsamans 16 íbúðir í Lonunum og Barakkini, sum skulu umvælast og dagførast. Mælt verður til, at kommunan setur fígging av til at umvæla og dagføra hesar íbúðir. Tað verður byrja við at brunatryggja allar 16 íbúðir og umvæla ta einu íbúðina í Lon, sum hevur staðið tóm síðani heystið 2023. Síðani kann kommunan dagføra íbúðirnar, so hvørt sum tað er møguligt og/ella, tá borgarar m.a. flyta. Sum íbúðirnar verða dagførdar kunnu nakrar av teimum minnu íbúðunum oyramerkjast til ung, sum hava tørv á egnari íbúð eitt tíðarskeið.

Bygningsdeildin hevur gjørt fylgjandi kostnaðarmeting:

- Tann eina íbúðin í Lon má høvuðsumvælast og dagførast, umframt at allar 13 íbúðirnar í Lonunum verða brunavardar = 3,0 mió. játtan í 2025.
- Barakkin í V.U. Hammershaimbs gøtu verður brunavard í 2026 = 1,5 mió.

| Býráðsfundur<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 428<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57016 | Golf | 2575 | Nýggj verkætlan | Dagføring og umvæling av sosialu íbúðunum | Stovna nýggja verkætlan undir sosialu deild | 3.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini til at taka undir við at;

- Tann eina íbúðin í Lon, sum hevur staðið tóm verður høvuðsumvæld og dagførd, umframt at allar 13 íbúðirnar í Lonunum verða brunatryggjaðar. Kostnaðarmetingin fyri at gera hetta arbeiði er mett til 3.0 mió

- At fluttar verða 3 mió av 5775 L57016 Golf til nýggja verkætlan "Dagføring og umvæling av sosialu íbúðunum" sum sosiala deild varðar av

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Ein meiriluti, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, men ikki við fíggingarleistinum at taka pening frá Golf.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men ikki við fíggingarleistinum at taka pening frá Golf.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Kári Johansen legði fram eitt broytingaruppppskot um at taka undir við tilmælinum við tí broyting at fíggingin verður tikin av konto 6110.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, tekur ikki undir við broytingaruppskotinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við broytingaruppskotinum.

Ein annar minniluti, Heðin Mortensen, atkvøddi blankt.

Broytingaruppskotið varð felt við 7 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongum atkvøðum ímóti og einari blankari.

## 151/25 Djóraverndarfelagið : Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg - 17/02152

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 63/25 | 25/02214-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 67/25 | 25/02214-5 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 102/25 | 25/02214-5 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 94/25 | 25/02214-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 105/25 | 25/02214-5 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 151/25 | 25/02214-5 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. *17/02152, Djóraverndarfelagið*: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg. Tilgongdin í málinum sæst í skjali nr. *17/02152-12, Djóraverndarfelagið: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg.*

Djóraverndarfelagið sendi Tórshavnar kommunu eina umsókn um eitt lendi til at byggja eitt djóraherberg á.

Djóraverndarfelagið arbeiðir við at bøta um umstøðurnar hjá djórum í Føroyum, og tey upplýsa, at hetta arbeiðið er avbjóðandi, og tørvur er at skipa umstøðurnar betri enn tær eru í dag. Tørvurin á djóraverndarfelagnum veksur hvørt ár, tí fráboðanir og málini eru ofta álvarsom. Tey fáa nógvar fráboðanir, eitt nú frá privatpersónum, løgregluni, almannaverkinum og landssjúkrahúsinum.

Ein tann størsta avbjóðingin hjá felagnum er at hýsa teimum djórunum, tey fáa inn. Tískil søkja tey um eitt øki, har tey eisini kunnu byggja eitt djóraherberg.

Tí ynskja tey at byggja eitt herberg til djórini á uml. 400 $m^2$. Við hesum fáa tey hjálpt enn fleiri djórum á ein meira skipaðan hátt. Samanlagt er tørvur á einum øki á uml. 6000 fermetrar.

**Lýsing av málinum**
Sum eisini sæst í gomlu málslýsingini, so hava nógvar staðsetingar verið umrøddar, men torført hevur verið at finna fram til endaligu staðsetingina.

Seinastu tíðina er umsitingin vend aftur til staðsetingina úti í vika, matr. nr. 1078.

Økið, sum Djóraverndarfelagið søkir um skal vera uml. 6.000 fermetrar til víddar. Sí uppskot til øki at lata Djóraverndarfelagnum:




Mælt verður til, at endaliga skapið og støddin á matriklinum verður nágreinað í tilgongdini við at gera endaliga sáttmálan.

Matr. nr. 1078 er leigutrøð, og er trøðin leigað út til privat persón. Umsitingin hevur verið í sambandi við núverandi leigara, sum er sinnað at lata part av trøðni til Djóraverndarfelagið. Hon ynskir tó at varðveita part av trøðni til egna traðarnýtslu. Ynski frá núverandi traðarleigara er, at skúrurin verður verandi á tí partinum av trøðni, sum hon framhaldandi kemur at varða av.

Djóraverndarfelagið upplýsir, at tey eru sinnaði at samstarva við Aktingarmannin í mun til upptøku av djórum, og vísa tey eitt nú á, at tá tey hava fingið bygt djóraherbergið, so kundu tey t.d. yvirtikið onkur av djórunum til ansing, sum Aktingarmaðurin tekur upp.

Aktingarmaðurin hevur matr. nr. 1077a til upptøkutrøð, men manglar honum eitt hús á trøðni. Umhvørvisdeildin arbeiðir við málinum at byggja hús til aktingarmannin á matr. nr. 1077a – uml. 30 fermetrar, sum skal brúkast til upptøku av djórum, útgerð, goymslu o.a. Víst verður til mál nr. *25/03553, Nýtt aktingarhús á matr. nr. 1077a, Tórshavn.*

Umhvørvisdeildin upplýsir somuleiðis, at tað eigur at bera til at samstarva um ymisk viðurskiftir.

So statt er tað upplagt, at Djóraverndarfelagið verður staðsett í Vika, soleiðis at samvirkanin millum virksemini kann gerast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í Almennu byggisamtyktini partvís í 4. grundumráðið, *sum er lagt til landbúnað, alment frílendi og tílíkt* og økisparti B3, *ætlað vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi*.

Mett verður, at eitt djóraherberg kann byggjast í tí partinum av trøðni, sum liggur í økisparti B3.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er av stórum týdningi at fáa málið viðv. staðsetingini avgreitt, soleiðis at Djóraverndarfelagið kann koma víðari við sínum ætlanum, og soleiðis at tey á nøktandi hátt kunnu virka fyri endamálinum hjá Djóraverndarfelagnum.

Uppskot til leigusáttmála sæst í skjal nr. *25/02214-4, Leigusáttmáli. Lendi til Djóraverndarfelagið*.

Vísandi til, at tað verður bygt á ognini, verður talan um leigusáttmála, sum er óuppsigiligur frá kommununar síðu í 25 ár. Tá hetta tíðarskeiðið er farið, kann sáttmálin sigast upp av báðum pørtum við eitt ára freist. Sí tó § 10 í sáttmálanum.

Tað er neyðugt, at frámatrikulera leigaða økið, og Djóraverndarfelagið kann tá veðseta bygning á leigaðum undirlendi, í sambandi við møguliga lántøku.

Tilsøgnin verður treytað av neyðugum loyvum frá almennum myndugleikum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/02152, Djóraverndarfelagið: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*17/02152-12, Djóraverndarfelagið: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg.*
*25/02214-4, Leigusáttmáli. Lendi til Djóraverndarfelagið*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Tann parturin av trøðni, sum verður latin Djóraverndarfelagnum, skal frámatrikulerast. Útreiðslurnar fyri sundurbýtið fella á Tórshavnar kommunu sum eigara av trøðni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til
- at partur áljóðandi á leið 6000 fermetrar av trøðni matr. nr. 1078 verður latin Djóraverndarfelagnum til teirra virksemi,
- at viðhefti leigusáttmáli verður samtyktur og
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking, at grannar, ið búgva í økinum, skulu hoyrast, áðrenn møguligt leigumál verður sett í verk. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum og mælir til at finna aðra staðseting, annaðhvørt úti í Havnardali ella í Kollafirði, sum áður hevur verið umrøtt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
15. apríl 2025 sendi umsitingin grannanum búsitandi á matr. nr. 1080 málið til hoyringar. Heitt verður á grannan um at koma við møguligum viðmerkingum til ætlanina at staðseta eitt Djóraherberg á part av matr. nr. 1078.

1. maj 2025 vóru viðmerkingar frá grannanum móttiknar, sí skjal nr. *25/02214-14, Hoyringssvar matr. nr. 1080, Tórshavn*, og verður víst á hesi viðurskifti:

- Ivasamt er, um ætlanin kann rúmast innanfyri verandi byggisamtykt.
- Tað verður mett burturvið at leggja tílíkt virksemið í býnum, og serliga á eini trøð, sum liggur í einum umráði, har annað djórahald er, og mælt verður til, at tílíkt virksemi eigur at verða staðsett uttan fyri býin. Mett verður ikki ráðiligt, at hundar og kettur og onnur djór verða so nær við tað djórahaldið, sum er í umráðnum, herímillum seyður, gæs, hønir og dunnur, verður uttan iva ræ ttiliga forstýrani og oyðileggjandi. Víst verður eisini á, at hara er seinastu trý árini blivin búføst í økinum rundan um.
- Somuleiðis verður víst á, at um henda ætlanin skal fremjast á valda økinum, er alneyðugt samstundis at gera nakað við atkomuviðurskiftini. Stiðjagøta frá Sendistovuni og oman til økið er alt ov smøl og er í sera ringum standi. So um meira ferðsla skal verða eftir vegnum, má vegurin gerast fyrst. Harumframt mugu parkeringsviðurskiftini gerast nøktandi á staðnum. Sum er, eru eingi parkeringspláss tøk fram við vegnum.
- Til seinast verður víst á, at tað er neyðugt at hegna munandi betri enn í dag, so tað er tryggjað at eingi djór sleppa av økinum.

Djóraverndarfelagið fekk eftirfylgjandi høvi at viðmerkja viðmerkingarnar hjá grannanum, sí skjal nr. *25/02214-16, Hoyringssvar, mai 2025. pdf*. Djóraverndarfelagið vísir á, at ætlaða virksemið hóskar seg væl til økið, bæði í mun til hvat verandi virksemið, t.d. hjá Aktingarmanninum, er í økinum í dag, og so vísa tey á, hvussu týdningarmikið tað er, at taka atlit til onnur djór í økinum, tá ætlanin hjá teimum verður fyrireikað og framd. Eitt nú vísa tey á, hvussu djórini eftir ætlan verða í búrum og innhegnað, og tey vísa eisini á, at neyðugt verður at ráðføra seg við onnur líknandi feløg uttanlands.

Somuleiðis vísir felagið á, at djór ikki koma at standa úti gjøgnum allan dagin (her verður hugsað um hundar, kettur og tílík djór), men koma tey at hava føst, stytri tíðarbil, har tey sleppa út í garð ella útibúður.

Til seinast vísir felagið á, at tað hevur stóran týdning fyri virksemið, at tað verður staðsett tætt upp at verandi býi, soleiðis at tað er lætt atkomuligt fyri øll við bili, bussi, súkklu og til gongu. Og verður somuleiðis víst á, at tað hevði verið gagnligt, um tað bar til at sleppa til økið frá høvuðsvegnum.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar til omanfyristandandi:

- Byggisamtyktin:

- Partur av matr. nr. 1078 liggur í økisparti B3-vinnuøki, har virksemi í hesum umráðispartinum skal kunna flokkast í umhvørvisflokkinum 2 til 4.

- Restin av matr. nr. 1078 liggur í økisparti 4. Grundumráðið, sum er lagt til landbúnaðarvirksemi.

- Mett verður, at júst grunda á hesar økispartar, so hóskar virksemið hjá Djóraverndarfelagnum seg til júst hesar økisásetingar, og tískil skal byggisamtyktin ikki broytast fyri at virksemi skal kunna loyvast í økinum.

- Staðsetingin hóskandi í mun til at hon er nær býnum og møguliga í andsøgn við annað djórahald:

- Sum hetta málið eisini hevur víst seg í tilgongdini, so hevur umsitingin síðani 2017, tá málið upprunaliga varð sent kommununi víst á ótalligar staðsetingar, sum hava egnað seg meir og minni.

  - Hendan staðsetingin lýkur ynskinum hjá Djóraverndarfelagnum um at verða staðsett tætt uppat býin, soleiðis at tað er lætt atkomuligt at reka. Felagið er sjálvboðið, og flest teirra, sum fremja sjálbodna arbeiðið í felagnum, búgva í Havnini. Tískil hevur ynski í allari tilgongdini verið, at staðsetingin er lætt atkomulig við bussi, súkklu og til gongu. Fleiri av teimum sjálvbodnu hava ikki atgongd til bil.

  - Hendan staðsetingin hóskar seg til annað traðarhald í økinum. Djóraverndarfelagið hevur í allari tilgongdini víst á, at teimum tørva eitt økið, har ein bygningur kann byggjast, og har tey hava møguleika at geva djórunum uttanumstøður eisini. Og sum teirra seinastu viðmerkingar eisini lýsa, so verður virksemið innrættað og framt/rikið í størsta varsemi í mun til annað djórahald í økinum, hetta bæði í mun til innhegning, ljóðviðurskiftir og smittuvandar.

  - Til seinast er at viðmerkja, at kommunan hevur eina sokallað hundatrøð í Havnadali, har fólk rokast við hundum. Hendan trøðin er staðsett mitt millum annað djórahald, sum ikki verður mett órógva av hesum virkseminum. Harumframt eru tað nógvir borgarar, sum brúka gøturnar í Havnadali til at ganga túrar við hundum. Sostatt kann vísast á, at aðrastaðni í kommununi virka ymisku djórahaldini lið um lið, og er bara neyðugt, at økið verður hegnað, soleiðis at húsdjórini, sum Djóraverndarfelagið tekur sær av, ikki ávirka onnur djór í økinum neiliga.

- Viðv. atkomuviðurskiftunum:

- Núverandi vegur til økið, Stiðjagøta, er á leið somu breidd sum eitt nú Liasarvegur út í Havnadal og Kaldbaksvegurin, sum báðir hava og eisini koma at hava meiri ferðslu enn Stiðjagøta kemur at hava, hóast virksemið verður økt nakað við staðseta Djóraverndarfelagið í hesum økinum. Møguliga verður neyðugt at gera 1-2 víkipláss, soleiðis at bilar kunnu møtast, men mett verður ikki ráðiligt at gera hetta fyrr enn ítøkiligi tørvurin vísur seg.

Samanumtikið verður mett, at ein staðseting við leigumáli til Djóraverndarfelagið á matr. nr. 1078 er hóskandi. Í leigusáttmálanum eigur at verða staðfest, at kommunan, í samband við at Djóraverndarfelagið fer undir bygging av bygningi, kann seta krøv til virksemið, og hvussu hetta verður skipað og staðsett ítøkiliga á trøðna.

**Skjøl:**
Skjal nr. 25/02214-14, Hoyringssvar matr. nr. 1080, Tórshavn
Skjal nr. 25/02214-16, Hoyringssvar, mai 2025. pdf

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at:

- at partur á umleið 6000 fermetrar av trøðni matr. nr. 1078 verður latin Djóraverndarfelagnum til teirra virksemi,
- at viðhefti leigusáttmáli verður samtyktur við tí eftirfylgjandi tillaging, at kommunan kann seta krøv til virksemið, og hvussu hetta verður skipað og staðsett ítøkiliga á trøðni,
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at staðsetingin er skeiv, og hetta virksemið hoyrir ikki heima har.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:**
Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at staðsetingin er skeiv, at ferðsuviðurskiftini ikki eru egnaði til slíkt virksemi og hetta virksemið hoyrir ikki heima har.

Tróndur Sigurðsson viðmerkir, at trøðin eigur at verða førd víðari eftir galdandi reglugerð og ikki bert handað til Djóraverndarfelagið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Annfinn Brekstein setti fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina til tess at finna eina aðra staðseting.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála

Broytingaruppskotið fall við 8 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og ongari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 152/25 Alment WC á Hvítanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hvítanesnevndin | 12.03.2025 | 2/25 | 25/03897-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 93/25 | 25/03897-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 106/25 | 25/03897-1 |
| 4 Hvítanesnevndin | 16.06.2025 | 7/25 | 25/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 152/25 | 25/03897-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin vísir á, at tað manglar eitt alment vesi á Hvítanesi

**Lýsing av málinum**
Bygdin er nógv vitja av barnagørðum, havdypparum og øðrum. Einki alment VESI er í bygdini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2018 varð arbeitt við eini heildarætlan fyri almenn vesir í kommununi – sí mál nr. 18/03758.
Í hesum málinum varð einamest arbeitt við at fáa fleiri almenn vesir í býnum.
Sí yvirskipaðu heildarætlanina fyri almenn vesir í býnum, sí mál nr. 18/03758-11, *almenn wc heildarætlan 25-11-2020.*
Arbeiðið steðgaði upp, tá játtanin varð raðfest til aðra verkætlan.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03758, Almenn wc í Tórshavnar kommunu.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá staðbundnu nevndini:
Trupuleikin lýstur í stuttum
Nógv fólk koma aðrastaðni ífrá, at ganga túr á Hvítanesi. Fleiri koma at ganga túrin runt nesi, og nógv koma at vitja fjørðuna – tað eru serliga skúlar og barnagarðar. Seinastu árini eru fleiri fólk byrja at ”havdyppa” á hvítanesi, og somuleiðis síggja vit ofta útlendskar bilar á sumri steðga omanfyri fjørðuna, at njóta eitt ábit og útsýni.

Einki alment VESI er á Hvítanesi. VESI nýtast ikki at standa í hvørjari bygd og á hvørjum horni, men vit halda, at nógv talar fyri, at júst á Hvítanesi skal mann seta pengar av til eitt alment VESI. Tá fólk ganga oman á Hvítanes, ella taka bussin, so er mann eitt sindur avskorin fyri møguleikanum at koma á eitt VESI. Fyri kommununa vil tað eisini siga, at kommunan betrar um møguleikan hjá stovnum og skúlum at gera eina upplagda útflugt til Hvítanes við brúk av busleiðini.

Tað skal tó viðmerkjast, at fyri júst barnagarðar og skúlar, so royna vit í nevndini, at gera skúlan tøkan fyri fólk at fara inn í, ma. fyri at sleppa á VESI, men tað er bert um onkur kennur okkum og ringjur til okkum privat. Vit eru kunna um, at tað skuldi verið ein lykil á rundferð millum onkrar stovnar, fyri at sleppa inn á skúlan, og sum hendur kann fáast á, við at seta seg í samband við Snarskivuna. Vit kenna ikki til hesa avtalu. Í øllum førum vil eitt alment VESI hjálpa uppá hettar.
Nærri loysnir.

Vit halda, at tann upplagda staðsetingin er oman móti lendingini, antin omanfyri ella niðanfyri nestini. Kann evt byggjast saman við skiftirúminum hjá havdypparinum, sum er komi at standa oman móti lendingini. Soleiðis kann VESI skipast sum eitt mál fyri seg, og staðsetingin passar best fyri tey vitjandi í bygdini.
Um kloak og onnur viðurskiftið gera hettar trupult, so kann onnur staðseting finnast, sum er í tráð við átaksætlanina fyri økið um fjørðuna, men so má tað verður partur av eini stórri ætlan, standa í økinum norðan fyri fjørðuna, og tá mugu nógv viðurskifti koma uppá pláss.

**Skjøl**
- 18/03758-11, *almenn wc heildarætlan 25-11-2020*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Málið verður umrøtt við tí endamálið at finna útav, um málið skal raðfestast.

**Hvítanesnevndin 12. mars 2025:** Umrøtt. Finna eina loysn við wc-inum í skúlanum og at reingerðin verður skipað.

**Ískoyti**
Bygningsdeildin hevur gjørt uppskot til innrætting av almennum WC í skúlanum. Í hesum sambandi verður skotið upp, at verandi tvey WC´ir verða gjørd um til eitt WC, sum lýkur plásskravið um WC til rørslutarnað. Samstundis er neyðugt at asfaltera tún og parkeringspláss, soleiðis at WC verður gjørt atkomuligt fyri rørslutarnað.

Skúlin verður ma. brúktur til veitslur og annað virksemi, sum bygdafólkið skipar fyri. Í samskifti millum bygningsraksturin hjá kommununi og hvítanesnevndina er sett fram ynski um dagføring/nýgerð av køkinum. Køkurin er við í uppskotinum til broyting av innrætting í skúlanum, og samlaða loysnin í skúlanum er leysliga kostnaðarmett.

Bygningsdeildin hevur ábyrgdina av og ber rakstrarkostnaðin av reingerð av almennum WC´um.

Av tí at gl.skúlin á Hvítanesi ikki er serliga sjónliga staðsettur í bygdini, so verður mælt til, at skelti verður sett upp í bygdini, sum upplýsir at alment vesi er í gl. Skúlanum. Hetta eigur at verða gjørt samstundis sum at vesið verður innrættað.

**Skjøl**
jnr. 18/03758-3 TekningAlmentWCáHvítanesi 21-05-2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 438<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Av tí at eingin uppløgd játtan er tøk til at gera køk inni í skúlanum, verður mælt til, í fyrsta umfarið at fara undir at gera atkomuligt alment wc í skúlanum, og at játtan til at innrætta køk í skúlanum verður raðfest á fíggjarætlanini 2026.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | | Fríðkan, bygdir og økir | 6275 | | | Alment WC á Hvítanesi | 225.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 225.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 40.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski Stjóri, Býararkitekturin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til:
- at gera WC til rørslutarnað við túni og rampu, sambært tekning, og at játta kr. 225.000 av kt. 6275, LK62998, Fríðkan bygdir og økir, á nýggja verkætlan undir kt. 6275 til hetta,
- at skeltið verður sett upp í bygdini, sum vísir til vesið,
- at játtan áljóðandi kr. 175.000 verður raðfest á Fíggjarætlanini 2026 til at gera køkin í skúlanum. at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Hvítanesnevndin 16. juni 2025:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum, býararkitektinum og leiðarinum á Bygningsdeildini.

# 153/25 Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.1 - 23/06318

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 74/25 | 25/04323-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 97/25 | 25/04323-2 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 153/25 | 25/04323-2 |

**Upprunin til málið**
Talan er um framhald av máli nr. 23/06318 – sí viðheftu málslýsing, sum lýsir gongdina í málinum, j. nr. 23/06318-2, Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1.

19. september 2024 samtykti býráðið:
- at selja og sundurbýta økið 5.1 til tilboðsgevara, Sp/f SH Ráðgeving við Hanusi Olsen
- at Tórshavnar kommuna stendur fyri at savna ein keyparaskara og lutar raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggjar tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Lýsing av málinum**
SH Ráðgeving hevur síðani arbeitt víðari við málinum, og hevur keypari víst á, at tað kanska hevði verið ein góður eyka møguleiki hjá komandi keyparum av raðhúsunum at hava møguleikan at keypa raðhúsaeindirnar óinnrættaðar, og so statt einans sum innilokað raðhús.

27. november 2024 sendi SH Ráðgeving kommununi (Byggimálsdeildini) umsókn um byggiloyvi. Í tilfarinum var somuleiðis ein umsókn um at kunna selja raðhúsini innilokað, sí j. nr. 25/04323-1, Umsókn um innilokaði hús.

Raðhúsini eru í trimum hæddum og verða uml. 210 fermetrar samanlagt. Sølukostnaðurin er fastur prísur fyri lyklaklár hús, áljóðandi kr. 4.450.000.

Í umsóknini verður upplýst, at raðhúsini, einans innilokaði, kunnu seljast fyri kr. 3.490.000. Innilokað hús hava undirsløg lagt í í lofts- og miðhædd við krossfinerplátum álagdar. Kjallaragólv er bjálvað, og klapplag er stoypt. Brunaverja í takkonstruktión millum húsini er gjørd. Íbindingargjald til fjarhita er íroknað søluprísin.

Í løtuni verður arbeitt við at gera endaliga sølutilfarið klárt, soleiðis at kommunan kann fara undir at savna ein keyparaskara og luta raðhúsaeindirnar út millum hesi og harvið tryggja tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggisamtyktin er gjørd fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at tað í hesum tíðum, møguliga er gott hjá endaliga fyrstu ferð keyparunum at kunna standa sjálvi fyri endaligu innrættingini. Fíggjarliga eru fólk í hesum tíðum rættiliga sperd, og at fáa møguleikan at keypa eini raðhús á uml. 210 ferðmetrar fyri kr. 3.490.000 verður mett vert at kunna bjóða endaliga keyparanum.

Við at ganga umsóknini á møti merkir einans, at endaligi keyparin fær møguleikan at velja at keypa innilokaði ella liðug bygd hús. So statt verður ikki mett, at hetta er ein bági fyri endaliga keyparan, men heldur ein góður møguleiki at kunna bjóða keyparanum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Uppruna málið – *25/04323, Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 5.1 og øki 5.2*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Stjórnarskrivstovan vísir á, at skeytið leggur upp til, at eindirnar verða seldar sum liðugt innrættaðar eindir og við bústaðarskyldu (§ 9 í skeytinum). So statt verður neyðugt at taka hædd fyri hesum, um hetta verður broytt, og um onkur velur at keypa eindirnar einans innilokaðar.

Stjórnarskrivstovan tekur annars undir við at loyva umsóknini, grundað á viðmerkingarnar um, at tað møguliga gerst lættari hjá summum keyparum at ogna sær ein bústað.

**Skjøl**
j. nr. 25/04323-1, Umsókn um innilokaði hús

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býarakitekturin mæla til:
- at ganga umsóknini á møti, og at raðhúsini verða boðin út, soleiðis at keypari fær valmøguleikan at keypa raðhúsini sum liðugt bygd raðhús ella innilokaði raðhús.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Nevndir tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sp/f S.H. Ráðgeving hevur kunnað umsitingina um, at av tí at verkætlanin er so nógv seinkað, grundað á longu viðgerðartíðina hjá Tórshavnar kommunu, so standa undirveitararnir ikki við síni tilboð longur, og so statt hækkar kostnaðurin fyri hvørja raðhúsaeind.

Upprunaligi kostnaðurin fyri hvørja raðhúsaeind, sum verkætlanin varð samtykt við, var áljóðandi kr. 4.450.000. Nýggi hækkaði kostnaðurin er áljóðandi kr. 4.500.000, t.m. at hvør raðhúsaeind á hvør sínar 210 fermetrar er hækkað við kr. 50.000.

Henda støðan er sjálvandi sera harmilig, men skyldast hon, at stykkini í útstykkingini vórðu boðin út ov tíðliga, við nógvum óvissum, og var verkætlanin ikki nóg búgvin, t.d. var matrikulleringin ikki avgreidd og byggimálsdeildin kundi tískil ikki endaliga viðgera umsóknina. Tilboðið varð upprunaliga latið kommununi 19.07.2024. So statt er skjótt eitt ár gingið, og vita vit, at tíðin kemur í spæl í sambandi við tílíkar verkætlanir. Verkætlanin hevur enn ikki fingið endaligt byggiloyvi.

Raðhúsini á 210 fermetrar verða seld sum lyklaklárar bústaðareindir. Fermetrakostnaðurin fyri bygdu fermetrarnar verður so statt kr. 21.428.

Bústaðir byggir sínar bústaðir fyri áleið 25.000 kr/fermeturin.

Sp/f S.H. Ráðgeving hevur upplýst, at meklarin Betri Heim hevur mett, at søluprísurin á raðhúsaeindunum liggur á uml. 27.000 kr/fermeturin. Sostatt hevði eitt annað raðhús á 210 fermertrar verið selt í fríðari sølu fyri áleið kr. 5.670.000.

Kommunan kann so statt veita borgarum í kommununi við hesi verkætlanini nøkur raðhús, sum eru áleið 5.500 kr bíligari pr. fermetur og heilar 1.170.000 kr bíligari í mun til aðrar sølur av bústøðum í kommununi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja, at endakostnaðurin fyri raðhúsaeindirnar á 210 fermetrar verður hækkaður frá kr. 4.450.000 til kr. 4.500.000, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 154/25 Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 105/25 | 25/05791-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 107/25 | 25/05791-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 154/25 | 25/05791-1 |

**Upprunin til málið**
Rakstrarjáttanin kt. 6510, kirkjugarðar, hevur verið undir stórum fíggjarligum trýsti seinastu árini.

Yvirskipað eru fleiri grundir til fíggjarliga trýstið, og niðanfyri síggjast nakrar av orsøkunum:

- Størri krav til røktina á kirkjugørðunum
- Slátturin av grasinum verður í størri mun boðin út. Síðani 2020 er allur sláttur boðin út.
- Fleiri og størri kirkjugarðar at røkja.
- Fleiri jarðarferðir
- Lønarviðurskiftini
- Leiga av amboðum

Ynski er at fáa standin og raksturin á kirkjugørðunum at verða raðfestan, soleiðis at kirkjugarðarnir í kommununi verða røktaðir við tí tign og virðing, sum verður kravt av teimum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 varð játtanin hækkað við kr. 1.700.000, sí mál nr. *24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*, umframt at kr. 900.000 vórðu játtaðar sum eykajáttan til kt. 6510. Í 2023 hevði kontan eitt hall á kr. 380.000, sum hendan eykajáttanin somuleiðis mátti dekka.

Í máli nr. 24/01618 varð somuleiðis samtykt, at umsitingin skuldi venda aftur í nevnd við einum uppskoti um, hvussu raksturin í kirkjugørðunum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini.
Hetta varð ongantíð gjørt, og nú eru kirkjugarðarnir komnir aftur undir býararkitektin og Býarskipanardeildina. Í hesum sambandi hava býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum gjøgnumgingið virksemið og játtanina fyri fíggjarárið 2025.

Lønarviðurskifti
Lønarviðurskiftini eru í einari fastari og støðugari legu og kemur lønarjáttanin fyri 2025 tískil væntandi at halda

Dagføringar av amboðum og rakstrargøgnum:

- Amboðini á kirkjugørðunum verða í høvuðsheitum leigaði frá Verkstaðnum. Onkur eldri amboð eru tó uttanfyri hesa leiguskipan, og verða nú tí tørvur er at skifta tey út, koyrd undir somu leiguskipan. Hetta gevur hægri útreiðslur til leigu, men framtíðar útreiðslurnar til viðlíkahald koma at lække.
- Ítøkiliga fevnir hendan útskiftingin um stóru og lítlu gummigedina og ein arbeiðsbil.
- Samanlagt kosta hesar dagføringarnar fyri árið 2025 kr. 253.660 afturat í leigukostnaði.

Grundrakstur:

- Harumframt verður játtanin brúkt til keyp av vørum og tænastum til at fremja grundleggjandi rakstrarlig arbeiðið á kirkjugørðunum, sum t.d. fevnir um:
    - Olju-nýtsla
    - El-nýtsla
    - Keyp av vørum (klæðir, nummarpelar til gravir, formar til gravir osfr.)

- Samanlagt kemur hesin parturin av játtanini at kosta uml. kr. 666.000, harav játtanin til hendan partin liggur á kr. 1.090.000, sostatt eru einans uml. kr. 424.000 eftir til uttanhýsis røktina.

Grøna røktin/slátturin á kirkjugørðunum:

- Býarskipanardeildin bjóðaði fyrr í vár grønu røktina út á kirkjugørðunum. Uttanhýsis veitararnir hava latið tilboð inn, og liggur røktin samanlagt á áljóðandi kr. 2.729.864 pr. ár.
- Av tí at partur av árinum 2025 er farið, so krevst einans fígging til ein part av hesum tilboðunum áljóðandi kr. 1.999.076.
- Røktin fevnir um sláttur á teimum 13 kirkjugørðunum í kommununi, umframt røkt av runnum.
- Í 2024 kostaði uttanhýsis røktin kr. 1.231.500, harav kr. 162.500 ikki vórðu goldnar í fíggjarárinum 2024, men eru goldnar í ár 2025.
- Tøka játtanin til hetta arbeiðið er kr. 424.000 *(sí omanfyri standandi punkt "Grundrakstur")*, og sostatt mangla kr. 1.575.000, fyri at játtanin skal halda.

Játtanin fíggjarárið 2025 til kt. 6510, kirkjugarðar, er áljóðandi **kr. 6.005.000**.

Út frá kendu útreiðslunum, lýstar omanfyri, umframt eini meting av hvat raksturin fyri økið annars kemur at verða í 2025, so er støðan tann, at játtanin má hækkast við tilsamans **kr. 1.895.221** fíggjarárið 2025. Sí skjal *j.nr. 25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*, sum lýsir útreiðslurnar.

Ítøkilig fevnir hendan økingin um:

- Øktur leigukostnaður í samb. við átroðkandi útskifting av amboðum á áleið kr. 253.660.
- Tørvur til uttanhýsis røktina á kr. 1.575.000 hægri enn verandi játtan rúmar.

Partur av hesi upphæddini, kr. 1.183.000, kann fíggjast av *kt. 6575, L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*. Fyri íløguna, *L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*, merkir hetta, at arbeiðið at seta gróðursetingar- og innbúgvsætlanina í verk ikki verður raðfest í 2025, eins og *mál nr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum*, lýsir.

Restin av teimum 1.895.221 kr, sum kirkjugørðunum tørvar í 2025, svarandi til 787.779 kr, verður mælt til at játta av meirinntøkunum fyri 2025, ella í øðrum lagi at støða verður tikin til hetta seinni í heyst.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Dagligi raksturin av kirkjugørðunum í Tórshavnar Kommunu fevnir um tilsamans 13 kirkjugarðar, har kirkjugarðurin við Velbastaðvegin, sum er nógv víðkaður og útbygdur hesi seinastu árini, er nógv tann størsti kirkjugarðurin í kommununi.

Hinir kirkjugarðarnir liggja spjaddir í ymsu bygdunum, ið eru komnar upp í Tórshavnar Kommunu gjøgnum árini. Eisini er onkur nýggjur kirkjugarður komin afturat, t.d. nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík.

Í kjalarvørrinum av hesi gongdini er umsitingin, røktin og viðlíkahaldið av kirkjugørðunum vorðin rættiliga umfatandi, men játtanin til konto 6510, Kirkjugarðar, hevur ongantíð verið dagførd samsvarandi hesi gongdini, og tískil er neyðugt at virða, at ásetta játtanin ikki røkkur til veruliga raksturin og neyðuga viðlíkahaldið.

Seinastu nógvu árini hevur konta 6510, Kirkjugarðar, havt árligt hall/meirnýtslu. Niðanfyri sæst yvirlit yvir meirnýtsluna á kontuni síðani 2015.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 444<br>Forkvinnunnar merki: |

Det sammenkædede billede kan ikke vises. Filen er muligvis blevet flyttet, omdøbt eller slettet. Kontrollér, at linket peger på den korrekte fil og placering.

Mælt verður til, at hædd verður tikin fyri hesi gongdini í sambandi við gerð av Fíggjarætlanini 2026, og at játtanin verður stillað samsvarandi ítøkiligu metingunum fyri rakstrarjáttanina.

Leiðarin av kirkjugørðunum og býararkitekturin hava gjørt eina meting av árliga kostnaðinum at reka kirkjugarðarnar í kommununi, soleiðis at kirkjugarðarnir frameftir verða riknir við tí tign og virði, ið hoyrir til henda raksturin. Metingin tekur støði í búskettinum fyri 2024-25 og sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*.

Búskettið fyri raksturin er sett upp við støði í kostnaðum frá 2024-25, og er lønin sett at vera tann sama í komandi ári, hóast lønarútreiðslurnar helst hækka nakað samsvarandi árligu stillingunum.

So statt eigur framroknaða játtanin 2026 í skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026,* at taka hædd fyri møguligum prísvøkstri, umframt natúrliga lønarvøkstrinum í samb. við ger av fíggjarætlanini 2026.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
jnr. 24/01618, Umbøn um eykajáttan til konto 6510
jnr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verkstaðið vísir á, at verandi amboð/maskinur, sum ikki eru í leiguskipanini, eru í so mikið ringum standi, at tørvur er at skifta tey út, longu í 2025.

## Skjøl

*24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*
*25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*
*25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6575 | L65008 | Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum | 6510 | | Kirkjugarðar | | 1.183.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.183.000 |

| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
|---|---|---|
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.183.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum mæla til:

- at játta kr. 1.183.000 av kt. 6575, L65008, Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum, sum eykajáttan á rakstrarjáttan kt. 6510, Kirkjugarðar,
- at  játtan til írestandi kr. 787.779 verður tikin til viðgerðar seinni í heyst.
- og at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt var fyrst um at beina málið aftur í fíggjarnevndina eftir uppskoti frá Annfinni Brekkstein.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 8 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri at taka undir við tilmælinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Samtykt varð við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari at taka undir við tilmælinum og beina málið víðari til aðru viðgerð.

# 155/25 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 107/25 | 25/06231-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.06.2025 | 42/25 | 25/06231-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 108/25 | 25/06231-2 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 155/25 | 25/06231-2 |

**Upprunin til málið**
Hetta mál er framhald av máli nr. 21/02624, Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.
Gamla málslýsingin sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c.*

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 203c bleiv í 2021 boðin út til raðhúsa- og/ella íbúðarbygging. Eitt tilboð varð móttikið, og varð tað samtykt at selja tilboðsveitara stykkið til raðhúsa- og íbúðarbygging. Men samráðingarnar rukku ikki á mál, og tí varð tilboðið avlýst.

Síðani varð økið boðið út í tveimum umførum í 2022, men grundað á, at eingi tilboð komu inn, varð samtykt at skipa økið til sethús, umframt at keypa nakað av lendi frá grannaognunum, soleiðis at sethúsaútstykkingin kundi skipast við grundstykkjum á 400 fermetar. Samráðingarnar við grannaognirnar komu væl ávegis, og økið varð boðið út til sethús.

Kommunan móttók tvey tilboð upp á at gera útstykkingina. Hallur Hansen, entreprenørur sp/f, vann útboðið, men grundað á, at kostnaðurin á sethúsastykkjunum gjørdist ov høgur, varð samtykt í býráðnum, at selja grundstykkini fyri kr. 500.000 pr. stk, og at játta kr. 2.500.000 fyri at fíggja írestandi fígging, sum kom at mangla í.

Kommunala eftirlitið tók málið upp og kom til ta niðurstøðu, at kommunur ikki kunnu fara undir útstykkingar, um tað frammanundan er greitt, at útstykkingin ikki kemur at hanga saman fíggjarliga og tær tí koma at áleggja skattgjaldaranum eyka útreiðslur

Samtyktin í býráðnum er tí ikki í samsvari við niðurstøðurnar frá kommunala eftirlitinum. Av hesi orsøk verður mælt til, at útboðið verður annullerað, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum mótvegis Tórshavnar kommunu, og møguligt endurgjald veitt honum í hesum sambandi.

Á várið 2025 varð arbeiðsbólkur settur at vísa á 7-10 átøk, sum kunnu gera sítt til at fremja málið um, at fleiri bústaðir verða bygdir komandi árini. Í hesum arbeiðinum lýsti átak E, at kommunur skuldu fáa loyvi til partvís at rinda fyri byggibúning. Tí verður mælt til, at farið verður aftur til upprunaætlanina við økinum, og harvið undir enn eina roynd at bjóða matr. nr. 203c út til bygging av raðhúsa- og/ella íbúðarbygging, har kommunan antin áðrenn ella samstundis luttekur í at skipa og gera vegin í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, tá ætlanin fyri økið er góðkend, og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið eigur at verða lagt fyri staðbundnu nevndina í Kollafirði til kunningar, tá tað er samtykt í býráðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Í núverandi støðu eru ongar fíggjarligar avleiðingar av málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verandi útboð til sethúsaútstykking verður avlýst, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum og møguligt endurgjald verður latið.
- At nýtt útboð fyri matr. nr. 203c verður skipað til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at gjørdar verða keypsavtalur við ognararnar av matr. 209a, 308 og 309, og at játta upp til kr. 410.000 alt eftir endaligu fermetrunum íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022 útstykking Lygnnes.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

# 156/25 Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu - 23/04346

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 96/25 | 25/02597-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 39/25 | 25/02597-2 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 02.06.2025 | 44/25 | 25/02597-2 |
| 4 Havnanevndin | 03.06.2025 | 30/25 | 25/02597-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 109/25 | 25/02597-2 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 156/25 | 25/02597-2 |
| 7 Nólsoyarnevndin | 23.09.2025 | 7/25 | 25/02597-2 |
| 8 Kollafjarðarnevndin | 24.09.2025 | 14/25 | 25/02597-2 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er framhald av málinum við sama navni "Sauna/ Saunagos í Tórshavnar Kommunu" j.nr. 23/04346. Sí skjal *j.nr. 23/04346-4, Sauna/Saunagos í Tórshavnar kommunu*.

Í hesum málið varð samtykt í Byggi- og býarskipanarnevndini:

- At heimila umsitingini at fara undir at hoyra neyðugu myndugleikarnar og hoyringspartarnar í hesum sambandi um at fáa nýtsluloyvi til at skipa vælveruvirksemi, so sum hitapottar og sauna, í einum parti av á kaiøkinum í Hoyvík, í einum parti av strandarøkinum í Sandagerði og við Bátahylin í Kollafirði. (í mesta lagi 100m² í hvørjum einstøkum føri)
- At heimila umsitingini at nágreina staðsetingarnar og menna ein góðan sáttmálaleist til at gera avtalur við áhugafelagsskapir og fyritøkur, sum ynskja at bjóða vælveruvirksemi fram í økjum, sum kommunan vísir á.

Nú er umsitingin komin nakað væl longri við málinum, og tískil verður málið lagt fyri av nýggjum, fyri at fáa loyvi at bjóða ítøkilig økir út til sjóbundið vælveru- og trivnaðarvirksemi.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur fingið fyrispurningar frá áhugafelagsskapum og fyritøkum um at fáa loyvi til at bjóða fram vælveru- og heilsutilboð, sum t.d. sauna, hitapottar o.a. á ymsum økjum í kommununi.

Eins og í londunum rundan um okkum, eru fyribrigdi, sum sjódypping, hitapottar og saunasmáttur við sjóvarmálan partur av eini trivnaðar- og vælverumentan, sum er komin fyri at vera.

Í Tórshavnar Kommunu síggja vit, hvussu henda mentanin spírar millum fólk og ymsar áhugabólkar, har umstøðurnar loyva tí á ein meira ella minni tilvildarligan hátt. Fólk dyppa í dag á støðni í Hoyvíki (sokallaðu gl. Hoyvík), á Sandagerði, á Hvítanesi, í Kaldbak, í Kollafirði, í Nólsoy osfr.

Men av tí at umstøðurnar at hýsa hesi mentanini eru lutfalsliga óskipaðar í verandi løtu, ber illa til at menna tær á ein tryggan og tilætlaðan hátt.
Vansarnir við hesum lutfalsligu óskipaðu viðurskiftunum eru fleiri, eitt nú kann nevnast, at:

- Illa ber til hjá kommununi at halda yvirlit yvir, hvussu umstøðurnar eru í hvørjum einstøkum føri, og eftirlit er ikki við um viðurskiftini hjá veitaranum eru nøktandi í mun til trygd, atkomu o.a.

- Illa ber til hjá kunningarstovum, sum t.d. Visit Tórshavn at leiðbeina ferðafólki og borgarum annars um hetta sum áhaldandi tilboð á sínum miðlapallum, tá viðurskiftini eru óstøðug og har ongin bókingaskipan er í ávísum førum.

- Mannagongdirnar eru lutfalsliga ógreiðar og avmarkaðar í mun til, hvussu veitarin knýtir seg í streym og vatnleiðingar í teimum ymsu økjunum, sum verða brúkt.

- Eisini hevur hetta við sær, at spontanar loysnir, sum t.d. viðfestivognar við sauna ella hitapottum síggja heldur klossutar út, og lýta um í einum vøkrum øki sum til dømis niðri á støðni í Hoyvík.

Tískil er ynskiligt við meira skipaðum viðurskiftum á hesum økinum, sum bæði kunnu tryggja:

1. At almenningurin fær atgongd til eitt áhaldandi, størri og tryggari útboð av vælveru- og heilsutilboðum.

2. At vinnan/veitarin fær greiðari mannagongdir at fyrihalda seg til og betri karmar at skipa sítt virksemi undir.

3. At umsitingarligi parturin av hesum gerst smidligari fyri kommununa.

Umsitingin hevur umrøtt, hvussu hesi mál kunnu røkkast á smidligasta hátt, hvørji øki í kommuni eru hóskandi til at skipa slíkt virksemi, og hvussu kommunan kann lofta umsóknum og fyrispurningum um at sleppa at bjóða fram ymiskt vælveruvirksemi í kommununi.

Í tilgongdini í hesum málinum hevur umsitingin mett, at fleiri øki eru væl hóskandi til at hýsa slíkum virksemi. Flestu av hesum økjunum hava smávegis inntriv fyri neyðini, áðrenn tey kunnu verða gagnnýtt til endamálið, so sum tað, at streym- og vatnleiðing skal leggjast til økið, og onnur hava meira umfatandi avbjóðingar, so sum at kloakk-útlát er í nærumhvørvinum, ella at Tórshavnar kommuna ikki eigur lendið, og at t.d. brúksavtala fyrst má fáast í lag við lendiseigaran.

<u>Soleiðis kann tilgongdin skipast</u>
Uppskot til, hvussu tilgongdin kann skipast, sæst í lýsing í viðhefta skjali, sí skjal *j.nr. 25/02597-3, Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK.* Útvaldu økini, sum umsitingin metir kunnu bjóðast út nú sum ein fyrsta roynd, síggjast í hesum sama skjalinum, umframt at uppskot til hvussu hetta kann verða skipað somuleiðis verður lýst.

Í skjalinum verður í fyrstu atløgu mælt til at fara undir at bjóða økir út í hesum støðum:

- Í bátahylinum í Álakeri. Her verður víst til tvær staðsetingar.

- Í og við bátahylin í Kollafirði. Onnur staðsetingin er har verandi ruskpláss er staðsett í dag, og tískil verður neyðugt at umskipa og møguliga flyta ruskplássið, um hendan staðsetingin skal bjóðast út. Hin staðsetingin í Kollafirði er við nýggju bátabrúnna.

- Við sandin/Malarenda í Nólsoy.

Sí viðhefta skjal *j.nr. 25/02597-3, Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK,* har staðsetingarnar eru lýstar við kortskjølum.

Uppskot til sáttmála fyri <u>leiguøki á sjónum</u> úgreinar m.a. at leigukostnaðurin er settur til kr. 5.000 árliga (u.mvg). Hesin kostnaðurin, sum er viðmælti kostnaðurin frá Tórshavnar Havn, tekur støði í leigukostnaðinum fyri eitt vanligt ferðavinnubátapláss. Sí skjal *j.nr. 25/02597-5, Leigusáttmáli á*

*landi_skabelón*.

Uppskot til sáttmála fyri leiguøki á landi við sjóvamálan útgreinar m.a. at árligi leigukostnaðurin er settur til kr. 42 pr. m² árliga (u.mvg) sum verður leigaður. Hesin kostnaðurin er somuleiðis viðmælti kostnaðurin frá Tórshavnar Havn, og er hann í samsvari við onnur leigugjøld í havnaøkjunum í kommununi. Sí skjal *j.nr. 25/02597-6, Leigusáttmáli á sjónum_skabelón*.

Brúksavtala um sjóvarmálan Í (gomlu) Hoyvík og í Sandagerði
Av tí at nógv tey mest nýttu økini til slíkt sjóbundið vælveru- og trivnaðarvirksemi eru økini á støðni í Hoyvík og í Sandagerði, verður mælt til, at kommunan fær í lag eina brúksavtalu um nevndu økir. Tað eru Búnaðargrunnurin og Føroya landsstýri, sum eiga og varða av hesum økjum.

Kommunan hevur tískil søkt Búnaðarstovuna um at kanna møguleikan til at fáa eina brúksavtalu í lag um økini, sum kunnu síggjast á viðhefta kortskjalinum *j.nr. 25/02597-4, Uppskot um øki fevnt av brúksavtalu - 09mai2025.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kunnandi fundur var við aktørarar innan økið fyri góðum 2 vikum síðani, har yvirskipaða ætlanin varð umrødd. Aktørarnir tykjast spentir og gleða seg at fáa viðurskiftini í rættlag.

Umhvørvisdeildin hevur gjørt vatngóðskuroyndir á teimum útvaldu staðsetingunum, sum hava fyrstu raðfesting. Hesar eru dagførdar 22. mai 2025. Vatngóðskukanningar verða eisini gjørdar í Álakeri um mánaðarskiftið mai/juni, og úrslitini av øllum hesum kanningunum kunnu síggjast á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu:

https://www.torshavn.fo/nattura-fritid-og-mentan/upplivingar-i-natturuni

Umhvørvisdeildin viðmerkir í hesum sambandi, at útbjóðingin av økinum í Álakeri má vera treytað av, at vatngóðskan á staðnum er nøktandi.

Tað kann skoytast upp í hetta, at um vatngóðskan á sjónum í Álakeri vísir seg at vera ivasom, so hava áhugaðir umsøkjarar sjálvir skotið upp, at køld kør við reinum vatni kunnu gerast á landi sum ein partur av teirra verkætlan, har t.d. saunagestir kunnu køla seg av. – Tað verður tá ábyrgd leigarans at kunna gestirnar um nýggjastu vatnkanningarnar hjá kommununi í økinum og biðja fólk taka alt neyðugt fyrivarni, um tey ætla sær á sjógv.

Viðvíkjandi ruskbingjunum við Bátahylin í Kollafirði, metir umhvørvisdeildin, at umstøðurnar við ruskskiljingini í Kollafirði kundu verið betraðar.

Í verandi løtu er trupult at sleppa eftir bingjunum, og tískil verður kranabilur týðum nýttur. Eisini er innhegnaða økið somikið trongt, at summar av bingjunum standa uttan fyri girðingina.

Í sambandi við ætlaninar um miðstaðarøkið í Kollafiriði um at skipa hetta økið sum trivnaðar- og vælveruøki, metir umhvørvisdeildin, at tað sømir seg, at ruskplássið í Kollafirði verður flutt á eitt betri hóskandi stað, og at hetta sjálvandi má gerast í tøttum samstarvi við Brennistøðina.

Í sambandi við júst hesa ætlanina við trivnaðar- og vælveruøkinum í Kollafirði, metir umhvørvisdeildin, at Í fyrstu atløgu ber til at umskipa hegningina / bingjurnar í økinum, soleiðis at tær standa betri, og at vælveruøkið fær tað plássið, sum er ætlað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/04346, Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu
25/02604 Kollafjørður - Heildarætlan fyri miðstaðarøkið

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Nevnast skal, at veitarin/arnir sjálvir skulu tryggja, at øll myndugleikakrøv verða fylgd.

Umhvørvisdeildin upplýsir, at um ein umsøkjari søkir um loyvi at hava hitapott ella størri kør við vatni í, so skal søkjast um svimjihylsloyvi hjá Kommununi.

**Skjøl**
j.nr. 23/04346-4, Sauna/Saunagos í Tórshavnar kommunu
j.nr. 25/02597-3, Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK.
j.nr. 25/02597-5, Leigusáttmáli á landi_skabelón
j.nr. 25/02597-6, Leigusáttmáli á sjónum_skabelón
j.nr. 25/02597-4, Uppskot um øki fevnt av brúksavtalu - 09mai2025

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | x | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | x | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri, stjórin á Havnaskrivstovuni, leiðarin á umhvørvisdeildini, leiðarin á teknisku deild og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at bjóða økini í Álakeri, í Kollafirði og í Nólsoy út til sjóbundið vælveru- og trivnaðarvirksemi.
- At farið verður undir tilgongdina at flyta verandi ruskpláss við bátahylin í Kollafirði til aðra staðseting í Kollafirði
- At senda málið til kunningar í avvarðandi staðbundnu nevndum
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina, og havnanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 03. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 157/25 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 26/25 | 25/01179-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 112/25 | 25/01179-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 157/25 | 25/01179-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | | | 25/01179-1 |

Málið er lýst í jnr. 22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla, sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Umsitingin kunnar um gongdina í útstykkingararbeiðinum og um fíggjarstøðuna. Í hesum sambandi verður biðið um at hækka útleggið.

Nú ynski er um, at farast skal undir at gera smærri vinnustykkir, verður tann parturin lýstur, og biðið verður um at hækka útleggið tilsvarandi.

Í sambandi við íbindingarvegirnar til Havnarvegin er samtykt, at inntøkur frá vinnustykkjunum á Ovara Hjalla skulu fíggja útreiðslur til vegagerðina. Í hesum sambandi verður biðið um fígging til íbindingarvegirnar við at hækka útleggið.

<u>Fíggjarlig viðurskifti viðv. liðugtgerð av verandi prosjekti:</u>
Fíggjarlig uppgerð primo juni 2025

| | |
|---|---|
| Samlað játtan íalt | kr. 88.000.000,- |
| | |
| Brúktar eru | kr. 64.859.000,- |
| Avlop | kr. 23.141.000,- |
| | |
| Virði á arbeiði at gera frá nú til avhending | kr. 65.451.796,- |
| Framskrivað fíggjarstøða | kr. -42.310.796,- |

So statt manglar játtan álj. kr. 42.310.796,- til at gera útstykkingararbeiðið liðugt, tvs. upprunaligu verkætlanina. Sí skal nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx.

Meirkostnaðurin stavar í høvuðsheitinum frá hesum:

1) Lendiskeyp kr. 26.865.000 – harav kr. 12.435.000 er fyri lendið til høllina við Tjarnir
2) Keyp av gróti frá Eysturoyartunlinum kr. 11.475.000
3) Matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000

<u>Fíggjarlig viðurskifti ísv. møguliga broyting av prosjektinum.</u>
Nú útstykkingararbeiðið er komið so mikið ávegis, ynskist støða verða tikin til um nøkur grundstykki skulu gerast minni. Sambært verkætlanini eru 29 grundstykki á stødd millum 1800 $m^2$ og upp til 9-10.000 $m^2$. Fyri at nøkta einum breiðari skarða av møguligum keyparum, hava ynski verið frammi um at gera 3 stór grundstykki til 22 smærri – støddin er ætlað at verða millum 250 og 500 $m^2$ hvørt.

Umframt liðuggerð sambært omanfyri standandi verður mett, at meirkostnaðurin av at býta grundstykkini sundur verður uml. kr. 14 mió. Víst verður til niðanfyri nevndu skjøl.

<u>Fíggjarlig viðurskifti ísv. íbindingarvegirnar í innkomuvegin (Havnarvegin)</u>
Víst verður til mál nr. 23/03480-1 Innkomuvegur – íbindingar o.a.
Á fundi 26.10.2023 samtykti fíggjarnevndin "*at taka undir við teknisku nevnd við teirri viðmerking, at fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.*"

Avgerðin var staðfest á býráðsfundum 26.10.2023 og 09.11.2023.

Sambært máli nr. 25/03480-1, Innkomuvegur – íbindingar o.a., í skjali nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx, verður mett at framskivaður fíggjartørvur fyri liðugtgerð av íbindingarvegunum er 15,2 mió kr. Sambært omanfyri nevndu samtykt verður útleggið fyri vinnustykkini á Ovara Hjalla økt við kr. 15,2 mió, sum í øðrum máli verða játtaðar til liðugtgerð av íbindingarvegunum.

**Skjøl**
22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla
25/05884-1 Fíggjarligt yvirlit smá vinnustykkir.xlsx
25/05884-2 Uppskot til smá vinnustykkir.pdf
25/05884-3 Tilboð frá Articon 19.03.2025.pdf
25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx.

## Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 42.310.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |
| | | | | | | | |

## Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1. Játta kr. 42.31 mió til liðuggerð av vinnustykkjunum fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.
2. Játta kr. 14 mió til framhaldandi útstykkingararbeiði av vinnustykkjunum fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | **Játtast á:** |
|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 14 mió. til framhaldandi útstykkingararbeiði av smærru vinnustykkjunum fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blank atkvøddi: Kári Johansen.

Málið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einar blankari atkvøðu.

# 158/25 Innkomuvegur – íbindingar o.a. - 23/03480

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 27/25 | 25/00243-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 113/25 | 25/00243-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 158/25 | 25/00243-1 |

Málið er lýst í málslýsing jnr. 23/03480-1 Innkomuvegur – íbindingar o.a., sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Nú vegarbeiðið at gera íbindingarvegin við hartilhoyrandi íbindingum sambært tíðarætlan verður avhendað um mánaðarskiftið juni/juli 2025, er talan um nakrar meirveitingar. Tørvur er á at fáa fígging til hesar meirveitingar, og biðið verður um játtan til tess.

Íbindingarnar eru:
1. Íbindingarveg millum rundkoyringina í Marknagili og Oyggjarvegin
2. Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Sundsvegin og Flatarvegin, íroknað brúgv um Hoydalsá.
3. Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Klingruvegin.
4. Íbindingarveg millum innkomuvegin og Føroya Arena.
5. Rundkoyring á Niðarahjalla

<u>Fíggjarlig uppgerð pr. 05.05 2025</u>

| | | |
|---|---|---|
| Samlað játtan íalt | kr. | 85.320.000 |
| Brúktar eru | kr. | 68.198.428 |
| Avlop | kr. | 17.121.572 |
| | | |
| Virði á arbeiði at gera til avhending | kr. | 32.352.349 |
| Framskrivað fíggjarstøða við avhending | kr. | -15.230.777 |

Vísandi til omanfyri standandi er tørvur á at fáa játtað 15,23 mió fyri at fáa rinda meirveitingarnar, sum eru neyðugar fyri liðugtgerð av verkætlanini so sum

1) Keyp av lendi frá BST kr. 3.100.000
2) Rundkoyring við Marknagil kr. 3.500.000
3) Íbinding í Oyggjarvegin v.m. kr. 3.000.000
4) Ymiskt, so sum lendiskeyp frá privatum, flyting av innkoyring til Hotel Føroyar, eyka spreinging við Klingruna, o.a., kr. 5.300.000

Á fundi 26.10.2023 samtykti fíggjarnevndin '*at taka undir við teknisku nenvd við teirri viðmerking, at fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.'*

Avgerðin var staðfest á býráðsfundum 26.10.2023 og 09.11.2023.

Víst verður annars til skjal nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx

**Skjøl**
23/03480-1 Innkomuvegur – íbindingar o.a.,

25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6975 | L69004 | Vinnustykkir | 8175 | L81054 | Innkomuvegur - íbindingar o.a. | | 15.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) játta kr. 15,2 mió fíggjað sum útlegg av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki (íløgur) L69004 Vinnustykkir, á kto. 8175, Vegir (íløgur) L81054 Innkomuvegur - íbindingar o.a., til liðugtgerð av verkætlanini sambært omanfyri standandi býráðssamtyktum frá 26.10.2023 og 09.11.2023 og at beina málið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í samband við gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni í verkætlan L69004 Vinnustykkir undir kt. 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur) er staðfest, at inntøkurnar frá hesi verkætlan ikki kunnu bera eitt økt útlegg til at fíggja omanfyri lýsta tørvin á eyka fígging til meirveitingarnar. Tí verður í staðin mælt til at hesar meirveitingar verða fíggjaðar við at økja lántøkuna í samband við innkomuvegin.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | Lántøka | 8175 | L81054 | Innkomuvegur - íbindingar o.a. | | 15.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við samtyktini hjá teknisku nevnd frá 02. juni 2025, við teirri broyting, at upp til 15,2 mió. kr. verða fíggjaðar við øktari lántøku í samband við verkætlan L81037 Innkomuvegur og beina málið víðari til býráðið til eina viðgerð.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við tí ískoyti at upp til 2 mió. kr. afturat verða settar av til endurbøting av lendi kring innkomuvegin.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

## 159/25 Heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 98/25 | 25/05665-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 40/25 | 25/05665-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 88/25 | 25/05665-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 110/25 | 25/05665-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 159/25 | 25/05665-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna stendur fyri nýggjum krøvum innan skúlaøkið. Hesi krøv fevna millum annað um færri næmingar í hvørjum flokki, nýggjar forskúlar og sum avleiðing eisini nýggj krøv til frítíðarskúlarnar í kommununi. Hetta hevur við sær avbjóðingar fyri verandi stovnar og krevst at gjørd verður eina heildarætlan fyri, hvussu stovnarnir innrætta seg, útbyggjast og staðsetast í ymisku býarpørtunum í kommununi við atlitið til herdu krøvini innan økið.

**Lýsing av málinum**
Tá ið vísast skal til staðsetingar av nýggjum kjarnutænastum til børn og ung (eitt nú skúlar, forskúlar og frítíðarskúlar) er tað ein fyrimunur um avgerðir kunnu takast á hollum vitanargrundarlagi, soleiðis at atlit verður tikið til verandi stand av bygningum og tørvi kring alla kommununa.

Til tess at fremja eina yvirskipaða lýsing av økinum mælir umsitingin til, at staðseting av verandi kjarnutænastum, umframt verandi og væntandi kapasitetur, verður neyvt kortlagdur.
Fyri at skipa arbeiðið tvørtur um ymisku kjarnuøkini, so verður mælt til, at ein arbeiðisbólkur verður settur, sum hevur til endamáls at:

- Skapa eina heildarfatan av teimum nýggju krøvunum og hvussu tey ávirka verandi stovnar.
- Kanna og lýsa, hvussu stovnarnir fyri børn og ung í dag arbeiða í mun til nýggju krøvini.
- Gera tilmæli til, hvussu krøvini kunnu setast í verk á ein samanhangandi hátt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðið skal fremjast í samsvar til tær lógir og ásetingar, sum eru galdandi fyri ymisku kjarnuøkini, tað verið seg skúla- og frítíðarskúlaøkið, umframt at arbeiðið má taka atlit til kommunalu býarskipanina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Til tess at fremja heildarætlanina verður mælt til, at skipa arbeiðið út frá trimum deiluppgávum:

1. Hvørji eru nýggju krøvini
    - Lýsa og kortleggja krøvini, broytingarnar í samfelagnum, fólkatalsfrøðina, sum eru við til at ávirka yvirskipaða bygnaðin á ymisku stovnunum
    - Eyðmerkja fyrimunir og vansar á ymisku stovnunum.
2. Stovnarnir og nýggju krøvini
    - Kanna, hvussu ymisku stovnarnir í dag møta og arbeiða við ella eru førir fyri at lofta teimum nýggju krøvunum (t.d. skúlar/flokkar við færri næmingum, forskúlar, frítíðarskúlar).
    - Lýsa møguligar avbjóðingar og møguleikar.
3. Tilmæli

- Gera uppskot til, hvussu krøvini kunnu náast við atlitið til:
  - Verandi bygning, møguligar útbyggingar, verandi skipan og møguliga nýggjar staðsetingar.
- Gera uppskot til í hvørji raðfesting politiska skipanin eigur at raðfesta ymisku stovnarnar

Sí annars eisini lýsing av Kjarnuuppgávunum hjá Barna- og ungdómsdeildini, j.nr. *25/05665-3, Kjarnuuppgávur hjá Barna- og ungdómsdeildini*.

Arbeiðsháttur
Mælt verður til at uttanhýsis ráðgevi samskipar og savnar tilfarið.
Arbeiðsbólkur fylgir arbeiðinum við afturvendandi fundum, hjálpir til at fáa nøktandi tilfar til ráðgeva, skipar fyri neyðugum fundum við stovnar ella onnur, sum kunnu hava eina ávirkan á arbeiðið osfr.

Arbeiðsbólkurin saman við uttanhýsis ráðgeva leggja tilfar fyri stjórn til umrøðu og góðkenningar, áðrenn málið verður lagt fyri avvarðandi nevndir til endaliga góðkenning.

Tíðarætlan
Arbeiðið byrjar beinanvegin og arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við frágreiðingina við skjótast gjørligt og í seinasta lagi við árslok 2025.

Luttakarar
Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum frá:
- B&U
- Mentamáladeildini
- Bygningsdeildini
- Býarskipanardeildini

Fíggjarætlan

| | |
|---|---|
| Setan av uttanhýsis ráðgeva (uml. 4 mánaðir á kr. 30.000) | kr. 120.000 |
| Grafisk uppsetan | kr. 50.000 |
| Óvissur | kr. 30.000 |
| Tilsamans | kr. 200.000 |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr.
25/00102 og 22/05751 Hoyvíkar skúli dagføring og høvuðsumæling (nýbygging)
24/07481 Umvæling av gamla Argja skúla til frítíðartilboð til 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gulaskúla (flyting av tilb. Í lonunum í Hoydølum)
25/03288 Hølisviðurskifti í frítíðarskúlanum til børn í Eysturskúlanum
25/03406 Frítíðarskúli til børn í Sankta Frans skúla
25/04293 Frítíðarskúli til børn í skúlanum á Fløtum
25/01116 Nýggjur stovnur til børn og ung 0-18 ár í Kaldbak
25/05134 Minni barnabólkar og harvið meira tíð til námsfrøði
24/01070 Lýsing av karmunum um námsfrøðiliga virksemið í 2024
25/01718 Frítíðartilboð til 3. - 6. flokk

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamáladeildin, Børn&Ung, Bygningsdeildin og Býarskipanardeildin standa saman um hesa málslýsing, og skal málið tískil í avvarðandi nevndir til góðkenningar.

**Skjøl**
*25/05665-3, Kjarnuuppgávur hjá Barna- og ungdómsdeildini*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3214 | | Broytingar og minni umvælingar | | | | | 100.000 |
| 4140 | | Ætlanir á skúlaøkinum | | | | | 50.000 |
| 7315 | | Kommunuætlan | | | | | 50.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 200.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri Mentamáladeildina, leiðarin fyri Børn&Ung og býararkitekturin mæla til at:

- arbeiðið at fremja heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung í Tórshavnar kommunu verður sett í gongd.
- arbeiðið verður goldið av hesum rakstrarjáttanum, sum lýst omanfyri:
  - kt. 3214, *Broytingar og minni umvælingar*,
  - kt. 4140, *Ætlanir á skúlaøkinum* og
  - kt. 7315, *Kommunuætlan*
- málið verður beint í býráðið umvegis trivnaðarnevndina, mentamálanevndina og fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum**.**

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 160/25 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 101/25 | 25/01086-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 160/25 | 25/01086-2 |

**Upprunin til málið**
Í 2017 móttók umsitingin umsøgn um byggiloyvi til hotellíbúðir Undir Bryggjubakka. Byggiloyvið varð útskrivað 7. juli 2021. Nærmastu grannarnir kærdu avgerðina, og 1. november 2022 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Føroya Kærustovni við avgerðini at ógilda byggiloyvið.

Skal byggingin lata seg gera við tí nýtslu, sum søkt er um, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Lýsing av málinum**
Galdandi sertaka byggisamtykt er upprunaliga frá 1972 og hevur til endamáls at varðveita dámin, sum sermerkir Tinganes og gomlu Havnina, og at byggja og endurbyggja á ein hátt, sum ikki stríðir ímóti tí gamla.

Økið Undir Bryggjubakka (kallað D1 í sersøku byggisamtyktini), hevur síðani 1972 verið lýst sum byggilendið. Ætlaða byggifeltið til hotellíbúðirnar fer tó út um linjunar, soleiðis sum tær eru lýstar í fylgiskjali 4 (sí Fylgiskjal 4 - Galdandi). Byggiøkini eru upprunaliga tillagað táverandi sjólinju, men í dag er bryggjan útbygd og plássið er betur millum bygningar og bryggjukantin. í viðgerð av byggiloyvinum (sí mál 17/01760), metti byggimálsdeildin, at tað er natúrligt, at bygd verður út um byggiøki í mun til grannabygningarnar og verandi bryggju, og at byggingin fylgdi verandi bygging á staðnum.

Í mun til nýtstluna í økinum loyvir galdandi byggisamtykt, vinnulívsendamálum og ítøkiliga: skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera (sí SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf). Vinnuliga er tað serliga ferðavinnnan, ið er vaksin nógv síðani hesa áseting, og Tinganes og gamla Havnin teljast millum høvuðsferðmál í Føroyum. Umsitingin metir tað vera hóskandi at broyta ásetinginarnar fyri D eindirnar, soleiðis at hesar eisini loyva bústøðum, og at loyva gistingarhúsum í D1. Umsitingin metir, at hetta kann menna ein meira fjølbroyttan og livandi býarpart.

Málið snýr seg tí um at broyta omanfyri standandi lutir, soleiðis at ætlanir fyri hotellíbúðir undir bryggjubakka kunnu fremjast. Hetta krevur tekstligar broytingar í serstøku byggisamtyktini, sí broytingarnar við reyðum/grønum á síðu 3 í skjalinum *Eindirnar D - Við rættingum.* Hetta krevur eisini eina dagføring av fygliskjali 4 (sí *Fylgiskjal 4 - Dagført*).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

Í almennu byggisamtyktini er ásett í kap. 4, § 3:

*2. grundumráði verður alt, sum tað er, lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

Í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina er ásett fyri eindina D2:

2. gr. Nýtsla økisins, eindirnar D: Vinnulívsendamál:

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.
b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.
c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

5. gr. Stødd og staðseting húsanna o.a., Eindirnar D

a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjalið IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygninginum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.
c. Í eindini D2 skal hæddin á bygninginum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.
d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera millum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjalið IV.
e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur tílík smáhús.
f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjalið III, ið er til skjals hjá býarverkfrøðingarskrivstovuni.

6. gr. Útsjónd húsanna

a. ......Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.
e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 168a og 156, Tórshavn. undir Bryggjubakka og Rektaragøta* journal nr. 17/01760
- *Kæra um avgerð hjá hjá TK um givið byggiloyvi á matr. nr. 168a, Tórshavn (hotellíbúðir undir Bryggjubakka/Rektaragøta)* Journal nr. 21/04171

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf,* journal nr. 23/03101-5
- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Rættað 28.02.2024,* journal nr. 23/03101-5
- *Eindirnar D - Við rættingum ,* journal nr. 23/03101-3
- *Fylgiskjal 4 - Galdandi,* journal nr. 23/03101-4
- *Fylgiskjal 4 - Dagført,* journal nr. 23/03101-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Dagført 28.02.2024*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Broytingaruppskotið til serstøku byggisamtyktina lá til hoyringar í tíðarskeiðinum 3. mai 2024 til 14. juni 2024.

Tá ið hoyringsfreistin var farin, 14. juni, hevði kommunan móttikið trý hoyringsskriv. Tvey eru frá grannum búgvandi á Reyni, og eitt er frá Tjóðsavninum. Heilt yvirskipað verður mælt frá, at byggja á matr. nr. 168a og at ein meira ítøkilig heildarætlan við árinskanningum verður gjørd í samstarvi við grannar og serstaka byggiráðið.

Tey trý hoyringsskrivini mótmæla ítøkiliga hesum viðurskiftum:

1. <u>Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina</u>

Ført verður fram, at tað vil ikki vera rætt at gera størri broytingar í serstøku byggisamtyktini, uttan at serstaka byggiráðið verður uppi í hesum arbeiðinum.
Somuleiðis verður víst á, at serstaka byggiráðið varð hoyrt í samband við byggimálið, og í 2017 høvdu tey hesar viðmerkingar til byggimálið:

- *Serstaka byggiráðið metir ikki at intentiónirnar í byggisamtyktini og tilhoyrandi fylgiskjølum verða fylgdar.*
- *Serstaka byggiráðið ynskir at ein árinskanning verður gjørd í mun til øki á Reyni og tey ið har búgva viðv. sólarljós/skugga, innilokan av bústaðarøkinum, økt ferðsla, larmur o.a."*

Funnist verður at, at hesar viðmerkingarnar ikki eru tiknar við, í mun til uppskotið um broyting av serstøku byggisamtyktini.

2. <u>Hæddin á bygninginum er ov høg</u>

Hotellíbúðarbygningurin, sum broytingarnar í serstøku byggisamtyktini fyrihalda seg til, er ikki lýstur alment í hesum málinum. Á kunnandi fundum og eftir at hava umbiðið innlit, hava partar sæð fyriliggjandi tekningar. Hæddarásetingin er ógreið, men fer væl upp um lýsingina í Fylgiskjali IV, sambært mótmæli.

3. <u>Økt ferðsla</u>

Virksemið í nýggja bygninginum fer sannlíkt at økja um bilaferðsluna. Í hoyringskrivunum verður gjørt vart við, at hetta fer at hava neiliga ávirkan á íbúgvar. Rektaragøta verður mett ov smøl til inngongd til nýggja bygningin, og økta ferðslan fer at minka um ferðslutrygdina. Ynskið er tí um at fáa ferðsluviðurskifti greinaði nærri.

4. <u>Ynskja ikki gistingarhús</u>

Mótmælt verður eisini at broyta endamálið við D1 eindini, so tað í framtíðini eisini kann nýtast til hotellvirksemi. Sambært mótmælunum uppliva íbúgvar á Reyni og Tinganesi longu neiligt trýst av øktari

ferðavinnu. Tá ið nýtslan framyvir fer at loyva gistingarhúsum, er vandi fyri, at virksemið í økinum verður einsháttað og einans nýtt til ferðavinnulig endamál.
Víst verður somuleiðis á, at verandi byggisamtykt ikki loyvir virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum....ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa. Og ført verður fram, at hotelíbúðirnar fara at hava hesar neiligu ávirkanir á tey sum grannar.

5. <u>Byggilinjan skal varðveitast</u>

Mælt verður frá, at broyta byggilinjuna, tí henda er ein týðandi partur av skapinum á Tinganesi. Víst verður eisini á, at sambært upprunaligu byggisamtyktini var ætlanin ikki at D-økini skuldu vera fult útbygd, soleiðis sum ætlanin nú fyriliggur, har bygningurin er breiðari enn upprunaligu tekningarnar á fylgiskjalið IV vísa. Eisini verður viðmerkt at upprunaliga byggifeltið framvið bryggjubakka vísir trýggjar bygningsrondir, og somuleiðis trýggjar passagur millum Rektaragøtu og Bryggjubakka. Av tí at verandi bygging í økinum ikki hevur fylgt hesi ætlan fer talið av passagum at minka frá 3 til 1, og úrslitið at Reyn verður "sperra inni".

**<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar til hoyringsskrivini:</u>**

<u>Til nr 1: Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina</u>

Serstaka byggiráðið, sum er sett við umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Fornminnissavn/Føroya landsstýri og grannum í økinum, hevur til uppgávu at vegleiða býráðið, tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtyktini.

Talan er sostatt um eitt ráð, sum verður hoyrt og skal vegleiða í samb. við byggimál.
Umsitingin hevur ikki mett, at serstaka byggiráðið eigur at verða hoyrt, tá serstaka byggisamtyktin verður broytt – ei heldur hevur hetta verið siðvenja at gera, tá serstaka byggisamtykt nr. 4 er broytt áður.

Viðv. at gera árinskanning av sólarljós/skugga, innilokan av bústaðarøkinum, øktari ferðslu, larmi o.ø, so metir kommunan ikki at neyðugt er at gera eyka kanningar hesum viðvíkjandi, tá talan er um bygging á einum matrikkli, sum longu er byggilendi, og tá mett verður, at byggingin annars í støðd og vavi fylgir teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri økið.

<u>Til nr. 2: Hæddin á bygninginum er ov høg</u>

Í byggimálinum, mál nr 17/01760, hevur Føroya Kærustovnur tikið støðu til at hæddarásetingarnar eru í lagi í mun til tað sum byggiloyvi er givið til.
Somuleiðis hevur byggiharrin eftir áheitan frá kommununi lækkað bygningina síðani Føroya Kærustovnur tók støðu til málið.

Yvirskipað samsvara verandi fylgiskjøl í byggisamtyktini frá 1972 ikki tí bygda undir Byggjubakka, og fer kommunan í næstum at dagføra hesi skjøl, soleiðis at tey samsvara verandi umstøður.

<u>Til nr. 3: Økt ferðsla</u>

Umsitingin er vitandi um at verandi vegir í økinum eru smalir og lúka ikki vegastandardir fyri vegir, sum verða gjørdir í dag. Og umsitingin er somuleiðis vitandi um, at serliga undir Bryggjubakka er ferðslurok um sumrarnar, tá fólk og bilar ferðast í økinum hvørt um annað. Hetta er allarhelst eisini galdandi fyri Rektaragøtu.

Matr. nr. 168a er í dag óbygdur og verður brúktur til parkering av 13 akførum. Hotelíbúðarvirksemið kemur helst at økja nakað um ferðsluna í økinum, av tí at meira lív kemur í økið, og fólk fara at ferðast til og frá hotelíbúðunum.
Byggimyndugleikin hevur sett sum krav, at niðasta hædd skal innrættast við fýra parkeringsplássum, tvs. at ferðsluliga í mun til akfør, so verður minni bilaferðsla út undir Bryggjubakka, tá tað verða munandi færri parkeringspláss í økinum, og tá hesi 4 parkeringsplássini verða partur av ítøkiliga hotelvirkseminum.

Umsitingin arbeiðir áhaldandi við átøkum fyri tryggja trygdina í økinum, t.d. kann vísast á átakið við pullertum fyri at minka um bilaferðsluna út undir Bryggjubakka.

Helst eiga ferðsluviðurskiftini at verða nærri nágreinaði, soleiðis at hóskandi ferðsluátøk fyri trygdina í økinum kunnu verða sett í verk, men hóast ynskiligt er at fara undir hesa greining av økinum, so kann hon ikki forða eini bygging á matr. nr. 168a, tí økið er lagt út til bygging í núverandi byggisamtykt, og tá ítøkiliga virksemið ikki verður mett at økja meir um ferðsluna í mun til um okkurt annað virksemið verður bygt á økinum. Umsitingin vil vísa á, at øll bygging í økinum vil økja nakað um ferðsluna.

Til nr. 4: Ynskja ikki gistingarhús
Í verandi byggisamtykt verður loyvt virksemi til vinnulívi, so sum skrivstovu-, umsitingar- og handilsvirksemi. Eisini kann býráðið loyva goymslur og pakkhús.

Umsitingin metur ikki, at nýtslubroytingin til somuleiðis at fevna um bústaðir og gistingarhús í øki D1, fer at hava meiri neiliga ávirkan á grannalagið í mun til verandi loyvda virksemi. Hinvegin framleiðir gistingarhús helst minni ferðslu enn bústaðarbygging og skrivstovuvirksemi.

Í mun til rok, royk, deym, gang ella ristingar, so verður víst á, at talan er um hotelíbúðir, sum kunnu samanberast við vanligar bústaðareindir, tó at tey búgvandi verða ferðafólk.

Til nr. 5: Byggilinjan skal varðveitast
Umsitingin hevur tikið støðu til at broyta byggilinjuna samsvarandi verandi bygningar í økinum. Hesir eru ikki bygdir samsvarandi verandi byggisamtykt og fylgiskjali IV.

Tjóðsavnið førir fram, at innvikið her er ein týðandi partur av sjálvum skapinum av Tinganesi, og eigur ikki at kámast burtur við at flyta byggilinjur út.

Fylgiskjal 4 í galdandi byggisamtykt sýnir ikki at byggingin upprunaliga skuldi fylgja verandi matrikkulmarkið, heldur sýnir fylgiskjalið eina bygningsrond, sum leggur seg uppat Rektaragøtu og fyriheldur seg til upprunaliga bryggjukant. Hendan bygningsrondin er rættiliga greið og markant, og vildi tað verið óheppið at broti hetta við at kravt eitt innvik í ætlaðu byggingina á matr. nr. 168a.

Verandi matrikkul nr. 168a hevur eitt heldur óheppið skap í mun til verandi byggisamtykt, tí um bygt verður eftir núverandi matrikkulmarki, so kemur endamálið við verandi byggisamtykt við at skapa eina bygningsrond framvið Rektargøtu og upprunaliga bryggjukantinum ikki at kennast aftur. Somuleiðis er bryggjukanturin broyttur síðani byggisamtyktin upprunaliga varð gjørd, og tískil gevur innvikið ikki meining í mun til núverandi bryggjukant.

Sambært tekningunum av hotellbygninginum verður trappa bygd, og tí verður sambandið millum Rektaragøtu og Bryggjubakka fyri gongufólk økt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Byggiloyvið varð upprunaliga givið umsøkjara, grundað á, at umsitingin metti, at umsóknin fyrihelt seg til verandi ásetingar í serstøku byggisamtyktini.

Tá Føroya Kærustovnur broytir hesa niðurstøðu, og tá umsitingin annars hevur hildið og viðgjørt umsóknina út frá metingini, at virksemið býarskipanarliga hóskar seg á staðnum, og at tað tænir økinum býarskipanarliga at bygningsrondin verður inntakt, so verður mett neyðugt at broyta ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at bygningsrondin undir Bryggjubakka kann byggjast fult út.

**Nýggj skjøl**
Ummæli til Tórshavnar kommunu.pdf, journal nr 23/03101-9.
Hoyringssvar í sambandi við ætlaða broyting av byggisamtykt nr 1839563_1_1.PDF, journal nr 23/03101-10.
20240614-Braev_ut-TSF_t_Tk-Hoyringssvar_broyting_serstaka_byggisamtykt_nr_4.docx 1839781_1_1.PDF, journal nr 23/03101-11.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at staðfesta ætlaðu broytingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 4 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Rættað 28.02.2024,*
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at punkt d. undir eindunum D. verður strikað.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking til D økið, at har tað stendur at mest loyvda hædd til yvirtrom er 3-4 metrar, skal hetta vera 3 metrar, umframt at smogur verða uttan tak og sjónligar í fylgiskjalinum.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Guttormur í Skála

Ímóti broytingaruppskotinum atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Hildur Eyðunsdóttir og Kári Johansen.

Soleðis broytt varð sostatt samtykt at taka undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 161/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.01.2025 | 10/25 | 25/01097-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 41/25 | 25/01097-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 95/25 | 25/01097-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 161/25 | 25/01097-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær gjørdust partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Hetta málið er eitt framhald av málinum 22/03934, har byggisamtyktin fyri Nólsoy verður viðgjørd (sí viðheftu gomlu málslýsing, *Endurskoðan av byggisamtykt fyri Nólsoy).*

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum verður mælt til, at Nólsoy fær sína egnu almennu byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt sum í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Nólsoy, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethús
B: Vinnuendamál
C: Havnarøki
D: Almennir stovnar og mentan
E: Almenn frítíðarøki
F: Neyst og bátapláss
G: Friðað øki
H: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi

D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í upprunaliga málinum um Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy (22/04934) og síggjast í skjalinum *Ásetingar Nólsoy – Áðrenn og eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot um nýggja byggisamtykt fyri Nólsoy varð samtykt í býráðnum 30. mai 2024 og fór til almenna hoyring millum 18. september og 30. oktober 2024.
20. oktober 2024 varð almennur borgarafundur hildin í Nólsoy, har kunnað varð um broytingarnar í byggisamtyktini. Fundurin varð samskipaður saman við staðbundnu nevndini fyri Nóloys, og møttu væl av fólki upp til fundin.

Tá ið hoyringsfreistin var farin hevði kommunan móttikið eina viðmerking.

***Viðmerking frá borgara:***
Borgarin vísir á eina ætlan frá 2019, tá ið uppskot um at byggja trý hús fingu noktandi byggiloyvi, vegna ov lítla grundstykkjavídd, sum sambært uppskotinum var 285m$^2$ fyri hvørt húsið.
Vísir verður á, at uppskotið lækkar markið fyri minstu grundstykkjavídd í bústaðarøkinum (A) úr 400m$^2$ og niður í 300m$^2$, og at um hendan byggisamtyktarbroytingin varð framd fyrr, høvdu fleiri hús verið bygd í Nólsoy.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Býarskipanarliga hevur siðvenja verið at mæla til eina minstuvídd á 500 m$^2$ í bústaðarøkjum. Eitt minstamark á 500m$^2$, saman við byggi- og nýtlustigi á ávíkavist 0,3 og 0,6 tryggjar ein í Føroyum væl kendan sethúsadám, har pláss er fyri bæði urtagarði og meira enn einum bili inni á hvørjum matrikli. Tó er sera ivasamt um hesin leisturin er skilabest í Nólsoy.

Somuleiðis er at viðmerkja, at grundstykkjavíddirnar seinastu árini eru minkandi, serliga grundað á at tryggja meiri burðadygga nýtslu av lendinum. Umsitingin metir at tílíkar verkætlanir, eins og nevnda ætlanin frá 2019, har lutfalsliga smáir bústaðir standa á lutfalsliga smáum grundstykkjum, hóskar væl til umstøðurnar og bygdadámin í Nólsoy.

Í gomlu bygdini eru umleið 56 matriklar lýstir til sethús og til grundstykkir, har ið grundstykkjavíddin er millum 300m$^2$ og heilt niður í 42m2. Hesir matriklar fevna tískil um ein týðandi part av bygdini, við tilsamans 126 skrásettum bústøðum.

Sambært akstovuni eru 60 privatbilar skrásettir í Nólsoy, svarandi til 0,27 privatbilar per íbúgva. Hetta er munandi færri enn miðaltalið í Føroyum, sum er 0,5 privatbilar per íbúgva. Stóri munurin kemst av, at í Nólsoy er beinleiðis ferjusamband til miðbýin, og metir umsitingin at umstøðurnar tískil tala fyri einum munandi minni parkeringstørvi. Somuleiðis er kjarnin í bygdini sermerktur við tættari bygging.

Mælt verður til at lækka ásetingarnar fyri minstu grundstykkjavídd í øki A í byggisamtyktini fyri Nólsoy, frá 300m$^2$ og niður í 250m$^2$. Sostatt er møguleiki fyri at tætti bygdadámurin kann spjaða seg útum gomlu bygdakjarnuna í framtíðini, um umstøðurnar tala fyri tí.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri Nólsoy,* journal nr. 22/04934.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
**-**

**Skjøl**
- *Nólsoy Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01097-3
- *Nólsoy Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01097-3
- *Almenna byggisamtyktin - Nólsoy,* journal nr. 25/01097-3
- *Ásetingar Nólsoy – Áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 25/01097-3
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy,* journal nr. 22/04934-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið um nýggja byggisamtykt fyri Nólsoy, soleiðis at ásetingar fyri minstu grundstykkjavídd í øki A lækka frá $300m^2$ og til $250m^2$, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Dagførda uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy lá til almenna hoyring millum 4. februar og 18 mars 2025. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið eina viðmerking.

Viðmerking frá borgara:
Viðmerkingin (sí skjal *Dokument1.docx*) snýr seg ítøkiliga um ásetingar fyri umráðispart E-neyst, og mælt verður til:
*- at strika ásetingina í stk 5. «Treytin fyri at loyva frítíðar húsið...»*
*- ella broyta ásetinging soleiðis at umstøður skulu vera at hava bát og/ella reiðskap í neystinum umframt at neyðug innrætting til frítíðarhús eisini kann verða gjørd á niðastu hædd.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar til viðmerkingina:
Broytingaruppskotið hevði tryggjað, at ein størri partur av neystum kann innrættast til frítíðarvirksemi. Talan er tískil um ein grundleggjandi býarskipanarligan spurning, um hvussu og hvar summar- og frítíðarhús vera skipaði í kommununi/bygdini.

Uppskotið um endurskoðan tryggjar, at neystaøkið kann varðveitast til neyst, men sambært broytingaruppskotinum kann økið gerast frítíðarøkið burturav, og kann hetta við tíðini elva til stórar broytingar í dáminum.

Umsitingin ásannar at fyrimunir eru við at endurnýta neyst til summarhúsa- og frítíðarvirksemi, men er ynskiligt, at hetta verður skipað, soleiðis at neystadámurin framyvir verður varðveittur og møguligur.

Umsitingin er í eini tilgongd at nágreina ásetingar í Kollafirði, við atliti til eftirspurning at umbyggja neyst til frítíðarvirksemi á ein hátt, sum tryggjar at neystaøkir vera skipaði skynsamt framvið fjørðini (sí mál Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði – 24/01759). Mælt verður til, at umsitingin í fyrstu atløgu avgreiðir hetta málið, og síðani kann fara í holt við ítøkiligar ásetingar fyir neystaøkið í Nólsoy, í samráði við staðbundna nevnd og eigarar, soleiðis at hetta í framtíðini kann umskipast eftir tørvi, men við atliti til varðveitslu av siðsøgiligum dámi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neystaøkir í Kollafirði - 24/01759, journal nr. 25/01002

**Nýggj skjøl**
Dokument1.docx, journal nr 25/01097-7

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við verandi uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 162/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 31/25 | 25/01107-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 102/25 | 25/01107-4 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 162/25 | 25/01107-4 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av máli nr. 21/00804 (sí skjal *Málslýsing 21-00804 - upprunaliga málið*). Upprunin til málið stavar frá umsókn frá 2020, um at taka bygning niður og byggja nýggjan bygning á matr. nr 193. Ætlanin var, at nýggjur bygningur skuldi gerast við útvendum virksemi á veghæddini móti Vágsbotn-vegnum/bryggjuni millum Vágsbotn og Skálatrøð, sum ikki kundi lata seg gera sambært galdandi ásetingum í 2. grundumráði. Somuleiðis stavar málið frá eini umsókn fyri matr. nr. 190, har ætlanin var at gera eina totalumbygging av bygninginum, og mett var neyðugt at hyggja at økinum í eini heild fyri at tryggja, hvat økið skal loyva.

Farið var undir eina tilgongd at gera nýggja serstaka byggisamtykt, har endamálið er at skipa økið, soleiðis at tað kann gerast meira virkið, samstundis sum staðbundni dámurin verður varðveittur. Uppskotið inniheldur tískil treytir til útsjónd, mest loyvdu hæddarmetrar og nýtt krav um útvent virksemi á veghæddunum (sí skjal *Upprunaligt uppskot - Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð)*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt av býráðnum 21. mars 2024 og lá til hoyring millum 7. mai og 16. august 2024, og tá hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið 11 hoyringarskriv. Fleiri grannar vístu á ágangandi náttarlívið, og at ein lendistrappa og alment tilhaldsstað í økinum fer at vaksa um hesar trupulleikarnar.

Umsitingin gekk fleiri viðmerkingum á møti og dagførdi uppskotið, soleiðis at lendistrappan var burtur, ávísar ásetingar vóru rættaðar, byggilinja varð førkað, og størri dentur lagdur á varðveitslu av “Gamle Danmark” og neystinum í Vágsbotni. Dagført uppskot (sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð - 27.11.2024)* fór til almenna hoyring 27. november, og tá ið hoyringsfreistin varð farin, 16. januar, hevði kommunan móttikið tvær viðmerkingar.

Mótmælini leggja dent á viðurskiftir, sum vórðu viðgjørd í fyrra hoyringsumfarinum, men sum ikki vóru broytt í dagførda uppskotinum.

1. **Mótmæli frá Tróndargøtu 2**

Mótmæla uppihaldsøkið við Grím Kambans gøtu.

Nýtt alment uppihaldsøki verður frámatrikulerað og bygt í øki B, har tað í dag er grønur vøkstur. Hetta økið fer at hava neiliga ávirkan á trivnaðin hjá fleiri íbúgvum á Tróndargøtu og har á leiðini. Í mótmælinum verður eisini spurnatekin sett við viðurskiftini niðanfyri:

a) Hvør hevur rætt at brúka økið?
b) Hvør kemur at eiga/reka økið, (kommunan ella privatur eigari)?
c) Hvat fyri virksemi verður loyvið givið til?
d) Verður servituttur galdandi, ið setir treytir fyri hvat og hvussu byggjast kann á almenna økinum. Tekja, parasollir etc.
e) Hvussu verður atkoma til og frá almenna økið í framtíðini?

*Svar frá umsitingini:*

a) *Øki verður sambært uppskotinum skipað sum alment uppihald, og merkir hetta at øll hava rætt at uppihalda seg í økinum.*
b) *Økið verður sannlíkt matrikkulerað sum privat ogn. Dømi um privata ogn við almennari atkomu, eru at finna í Bojsensgarði. Dømi er eisini um at alment øki, t.d. framvið bryggjubakka, verður knýtt av privatum matstovum.*
c) *Sambært uppskotinum verður virksemið í økinum handlar, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligir stovnar og tílíkt.*
d) *Byggisamtyktin tekur ikki støðu til hetta, og vil hetta verða eitt mál, sum í hvørjum einstøkum føri verður tikið upp til viðgerðar, tá umsókn verður móttikin.*
e) *Enn er økið hvørki selt ella er umsókn móttikin um hvat onkur ætlar at byggja á økinum, og tískil er torført at upplýsa hvør ella hvussu atkoman verður – men umsitingin ynskir, at økið verður atkomiligt frá vegnum, eisini fyri rørslutarnaði*

*Umsitingin ásannar, at broytingar í bygdum økjum kunnu loypa ótta á grannar, men vil umsitingin vísa á endamálið við byggisamtyktini, sum handlar um at gera økið meira virkið, og varðveita staðbundna dámin. Ynskiligt er at fleiri økir í býnum verða gjørd atkomulig og brúkaravinarlig fyri borgarnar í býnum til uppihald og trivnað.*

*Almenna uppihaldsøkið við Jomfrúbakkan kann gerast eitt virðismikið aktiv, men sum mótmæli vísir á, er tað eisini vandi fyri at økið fer at viðføra ófrið og aðra neiliga ávirkan á nærmastu grannarnar. Býráðið samtykti at umsitingin fer undir at gera reglugerð fyri, hvussu og hvar náttarlívið í Tórshavnar kommunu skal skipast.*

*Mett verður, at ein náttarlívspolitikkur, kann vera við til at fyribyrgja neiliga ávirkan av náttarlívinum í miðbýnum.*

2. **Mótmæli frá grannum (umboðandi 14 bústaðir í grannalagnum)**

Skrivið vísir somuleiðis á vansarnar fyri bústaðarøkið, við at loyva nýggjum almennum uppihaldsøki framvið Grím Kambansgøtu. Økið fer at skapa økt órógv og ófrið um næturnar fyri nærmastu grannarnir. Hetta kemst av, at fleiri skeinkistøð sannlíkt fara at miðsavnast millum Vágsbotn og Skálatrøð, og almenna uppihaldsøkið verður partur av hesum virkseminum.

Økta náttarlívið elvir eisini til, at Tróndargøta í størri mun verður nýtt sum gonguleið millum býin, Grím Kambansgøtu og Vágsbotn, og tí fara neiligu avleiðingarnar eisini at merkjast fyri alt grannalagið.

Harafturat verður víst á, at fleiri hús í býnum verða keypt til stutttíðarleigu burturav, og er tað týdningarmikið, at menningin av býnum tekur hædd fyri og verjir bústaðarøkini í býnum.

*Svar frá umsitingini:*

*Viðvíkjandi almenna uppihaldsrúminum verður víst til svarið til 1. Mótmæli.*

*Umframt tørvin á einum náttarlívspolitikki, sum setir treytir fyri staðseting, upplatingartíðum og markinum fyri hóskandi umhvørvisárinum av náttarlívinum, er tað somuleiðis neyðugt, at kommunan tekur støðu til vansar, ið stutttíðarleigumál kunnu hava á grannaløg í býnum. 24. oktober 2024 samtykti býráðið, at Tórshavnar kommuna heitir á landsmyndugleikarnar um at fáa heimild til at seta reglur viðvíkjandi stutttíðarútleigu, (mál: 24/03446) og kann hetta vera liður í at varðveita grannaløg. Umframt bústaðarskyldu, kann tað hugsast, at kommunan fær fleiri amboð til at styrkja grannaløg í miðbýnum, og metir umsitingin, at hesi amboðini skulu brúkast heldur enn framyvir at fyribyrgja nýggjum møguligum almennum uppihaldsstøðum, sum liggja í ella við grannaløg.*

Kommunan móttók eisini eina viðmerking eftir at hoyringsfreistin var farin. Skrivið frá eigara av matr. nr. 187 og 188, mótmælir nýggja kravinum um útvent virksemi á veghæddini. Stórt sæð sama mótmælisskriv varð viðgjørt í samband við fyrra hoyringsumfarið, og er umsitingin framvegis av tí fatan, at haldast skal

fast í kravinum, vegna miðsavnandi staðsetingina, og at Vágsbotnur upplivist sum eitt alment atkomuvinarligt øki. Endamálið við nýggja kravinum um útvent virksemi í byggisamtyktini, er at tryggja hesi viðurskifti í framtíðini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu.
Ásetingarnar fevna um:

> *2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
>
> *Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*
>
> *Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 8 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 10 m$_2$.*
>
> *Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 1,25.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 20/03530 Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn
- 21/00804, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð
- 22/01370, Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 190, Tórshavn
- 22/02494, Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu
- 24/03446, TK ynskir yvirlýsing frá landsstýrinum um Airbnb og stutttíðarleigu

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð - 27.11.2024*, Journal nr. 25/01107-6
- *Málslýsing 21/00804,* journal nr. 25/01107-5
- *Hoyringarskriv í sambandi við ætlanina um at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið millum Vágsbotn og Skálatrøð,* journal nr. 25/01107-2
- *Mótmæli og broytingaruppskot í samband við ætlan um nýggja serstøka byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð*, Journal nr. 25/01107-1
- *Upprunaligt uppskot - Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð,* Journal nr. 25/01107-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at samtykkja dagførda uppskotið sum lýst í skjalinum, *Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð - 27.11.2024.pdf*.
- at halda fast í samtyktini frá 19. september 2024 um at fara undir at gera reglugerð fyri, hvussu og hvar náttarlívið í Tórshavnar kommunu skal skipast.
- at halda fast í samtyktini frá 19. september 2024 um at fara undir at gera skelting og møgulig portur, soleiðis at grannalív á Tróndargøtu og har umleiðir ikki órógvast óneyðugt av náttarlívi.
- og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Eftir uppskoti frá Kára Johansen varð fyrst atkvøtt um at beina málið aftur í nevnd.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Hildur Eyðunsdóttir

Ímóti atkøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Astrið Breckmann og Guttormur í Skála

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 8 atkvøðum ímóti, 4 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Astrið Breckmann, Birgir Nielsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Hildur Eyðunsdóttir, tekur ikki undir við tilmælinum.

Málið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

# 163/25 Havnin sum súkklubýur - 19/01370

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 37/25 | 25/05916-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 114/25 | 25/05916-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 163/25 | 25/05916-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 19/01370-1, *Havnin sum súkklubýur*, og er tann málslýsingin hjáløgd sum fylgiskjal.

Viðvíkjandi átøkum verður víst til framløguna í fylgiskjali jnr. 19/01370-40, *Havnin sum súkklubýur – frágreiðing, framløga 27.11.19*, sum varð løgd fram fyri byggi- og býarskipanarnevndini 27. november 2019.

Eisini verður víst til yvirlitið í fylgiskjali jnr. 19/01370-22, *Súkkluárið 2020 Málsetningur*, ið lýsir átøk, sum byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020 tók undir við at seta í verk.

**Ískoyti**
Í sambandi við omanfyri nevnda mál var ein raðfestingarlisti gjørdur, sum m.a. tekur støði í niðanfyristandandi:

1) Átøk innan infrakervi til súkkling
   - Gera súkklufarleiðir betri, sjónligari og tryggari
   - Minka hámarksferð hjá bilum á ávisum vegum
2) Hentleikar og aðrar umstøður til súkkling
   - parkeringspláss til súkklur (bæði inni og úti)
   - hentleikar og umstøður til súkklur á arbeiðsplássum
3) Samstørv og kampagnur um súkkling
   - At samstarva við skúlar, fyritøkur o.a., og stuðla tiltøkum sum t.d. Bikeability
   - Gera tiltøkum, lýsingar o.a., sum fevna, varpa ljós á súkkling, heilsugóðar ferðsluvanar, súkkluumstøður v.m.

Í 2019 Sambært s.12-14 í fylgiskjali jnr. 19/01370-40, Havnin sum súkklubýur – frágreiðing, framløga 27.11.19, varð eisini víst á møgulig átøk.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin metir, at játtanin til átaksøkini eigur at verða býtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1) | Átøk innan infrakervi til súkkling | kr. 1.400.000,- |
| 2) | Hentleikar og aðrar umstøður til súkkling | kr. 1.400.000,- |
| 3) | Samstørv og kampagnur um súkkling | kr. 200.000,- |

Vísandi til j.nr. 19/01370-22 Súkkluárið 2020 Málsetningur.PDF fer umsitingin at arbeiða víðari at raðfestingum, gera kostnaðarmetingum og seta í verk átøk.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nøkur av átøkunum verða at gera saman við øðrum myndugleikum sum t.d. ferðslumyndugleikanum.

**Skjøl**
jnr. 19/01370-1 Havnin sum súkklubýur (upprunaliga málslýsingin)
jnr. 19/01370-40 Havnin sum súkklubýur – frágreiðing, framløga 27.11.19.pptx
j.nr. 19/01370-22 Súkkluárið 2020 Málsetningur.PDF

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81061 | Gongu- og súkklubreytir | 8175 | | | Gongu- og súkklubreytir | 3.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til
- at heimila umsitingin at fara undir fyrireikandi arbeiði og seta í verk átøk innan játtanina sambært omanfyri nevnda býti millum átøksøkini.
- at játta kr. 3.000.000 av LK81061, Gongu- og súkklubreytir, undir kontu 8175, Vegir, til nýggja verkætlan, Gongu- og súkklubreytir, undir somu kontu, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at pengarnir verða nýttir til asfaltering av vegum í býnum og at betra um gongubreytirnar.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum vísandi til, at tað ikki er greitt, hvat játtanin ítøkiliga skal brúkast til.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur ikki undir við tilmælinum.

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 164/25 Raðfesting av konto 6177 - Umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk fyri 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 22/25 | 25/03442-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.05.2025 | 36/25 | 25/03442-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 02.06.2025 | 41/25 | 25/03442-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 122/25 | 25/03442-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 164/25 | 25/03442-1 |

**Upprunin til málið**
Málið snýr seg um raðfestingar av játtanini konto 6177, umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk fyri 2025.

**Lýsing av málinum**
Í umhvørvispolitikkinum 'Grøna leiðin' hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur. Hetta er eitt átak fyri umhvørvi í sambandi við ætlanina, at minka um CO2 útláti og dálking, somuleiðis at røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í aðrar varandi orkukeldur.

Í 2025 eru játtaðar íalt kr. 8,0 mió., harav kr. 0,5 mió. er avsett til ventilatiónsanlegg á Lágargarði. So statt eru kr. 7,5 mió eftir at raðfesta.

Umsitingin mælir til, at játtanin verður raðfest sum lýst niðanfyri, hetta er ein meting:

3 stk. ventilatiónsverk v/ hitapumpu til Eysturskúlan (útbjóðingartilfar er í gerð) kr. 3,0 mió.
Luft/vatn hitapumpur til Eysturskúlan (útbjóðingartilfar er í gerð) kr. 3,0 mió.
Nýtt orkusparandi glas til útistovur v.m. á Lágargarði kr. 1,0 mió.
Høllin á Stórheyggi, fjarhiti kr. 0,5 mió.

- Eysturskúlin brúkar uml. 120.000 litrar av olju og hevur harvið uml. 318 tons av CO2 útláti. Tá Eysturskúlin er lagdur um frá olju til varandi orku, minkar Co2 útlátið við 50-70%.

- Lágargarður brúkar uml. 80.000 litrar av olju og hevur harvið uml. 212 tons av CO2 útláti. Tað, sum nú verður gjørt, er fyri at minka um orkutørvin, soleiðis at leggjast kann um til varandi orku.

- Høllin á Stórheyggi brúkar uml. 17.000 litrar av olju og hevur harvið uml. 45 tons av CO2 útláti. Við at leggja um til fjarhita, kemur høllin ikki at brúka olju.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ætlanin er at gera eitt yvirlit yvir orkuátøk í bygningum, sum vísir raðfestingar yvir 5 ár, at leggja fyri nevndina í 2025.

Raðfestingin snýr seg yvirskipað um at minka um spillorku, og at gera íløgu í umlegging til nýggja orkuskipan.

Tað er stórur munur á orkutørvinum millum nýggjar og gamlar bygningar, t.d. kann nevnast, at hitanýtsla pr/m$^2$ fyri Skúlan á Fløtum er 54 kwt/m$^2$/ár, ímeðan Hoyvíkar skúli brúkar 120 kwt/m2/ár.

Tá vit velja orkuskipan, hyggja vit m.a. í hitaætlanina, og eftir staðsetingini av bygningum annars. Eisini er umráðandi at skifta gamlar oljutangar, sum ikki longur eru góðkendir.

Tørvur er á einum yvirliti og einari grundgivnari ætlan fyri orkusparing og orkuskifti í øllum bygningum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | Orkuátøk 2025 | | 7.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at taka undir við raðfestingini, sum lýst omanfyri, og at flyta kr. 7.500.000 av Løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 umsiting og røkt av bygningum, inn á verkætlanina Orkuátøk 2025, undir somu kontu, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið við Eysturskúlanum út og síðani koma aftur í nevndina.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at tað var samtykt at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið í Eysturskúlanum út, so koma tilboðini uppá luft til vatn hitapumpuskipan inn hósdagin tann 01.05.2025 kl.16.00.

Arbeiðini at gera trý nýggj ventilatiónsannlegg til Eysturskúlan verður bjóðað út í vikuni, og vit vænta, at tilboðini koma inn í viku 21-22.

Komið verður aftur í nevndina við samlaðum yvirliti og tilmæli um raðfesting, tá tað er greitt, hvat arbeiðini á Eysturskúlanum koma at kosta.

Kunnað verður um innkomnu tilboðini á fundinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. mai 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Tað eru 10.750.000 kr. á karminum LK61705, Orkupolitikkur.

Verkætlanin «Luft til vatn hitapumpuskipan til Eysturskúlan»
Tilboð, ið eru innkomin frá arbeiðstakara, eru áljóðandi u/mvg

MP: 2.954.665,00 kr
LM: 3.284.314,75 kr
SK: 5.078.220,00 kr

Umframt mun í prísi, er eisini munur á loysnunum sum verða bjóðaðar.
Verkætlanin verður mett til eina samlaða upphædd uppá 4,75 mio kr. íroknað tilboð, óvantað, optiónir, íbindingargjald, ráðgeving og mvg.

Biðið verður um heimild til at samráðast við teir bjóðandi og taka av besta tilboði.
Skotið verður upp, at flyta 4,75 mio kr. av karminum "LK61705", til verkætlanina nevnd; «Luft til vatn hitapumpuskipan til Eysturskúlan»

Verkætlanin «3 stk. ventilatiónsannlegg/v. hitapumpu til Eysturskúlan»
Tilboð eru ikki komin inn enn, men ráðgevin hevur gjørt eina kostnaðarmeting út frá veitara av ventilatiónsannleggum og er mett til eina samlaða upphædd uppá til 3,5 mio kr. íroknað, óvantað, ráðgeving og mvg.

Biðið verður um heimild til at samráðast við teir bjóðandi og taka av besta tilboði. Skotið verður upp at flyta 3,5 mio kr. av karminum "LK61705", til verkætlanina nevnd: «3 stk. ventilatiónsannlegg/v. hitapumpu til Eysturskúlan»

Eysturskúlin brúkar uml. 120.000 litrar av olju og hevur harvið uml. 318 tons av CO2 útláti. Tá Eysturskúlin er lagdur um frá olju til varandi orku, minkar CO2 útlátið við 50-70% og vit fáa útfasað oljunýtsluna hjá Eysturskúlanum.

**Skjøl**

| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 487<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | Luft til vatn hitapumpuskipan til Eysturskúlan | 4.725.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | 3 stk. ventilatiónsannlegg/v. hitapumpu til Eysturskúlan | 3.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til:
- at taka undir við raðfestingini, sum lýst omanfyri
- at flyta kr. 8.250.000 av Løgukarminum LK61705, Orkupolitikkur, undir kontu 6177, Umsiting og røkt av Bygningum, herundir
- at flyta kr. 4,75 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina "Luft til vatn hitapumpuskipan til Eysturskúlan"
- og at flyta kr. 3,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina "3 stk. ventilatiónsannlegg/v. hitapumpu til Eysturskúlan"
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. juni 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at tað ikki er gjørd nøkur kost/nyttu-greining, ið vísir, at íløgurnar loysa seg.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tróndur Sigurðsson skeyt upp at uppskotið varð broytt soleiðis, at játtað var kr. 500.000 til at knýta Høllina á Stórheyggi í fjarhitaskipanina.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann

Ímóti broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Broytingaruppskotið fall við 8 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og ongari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini.

Fyri tilmælinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Málið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 165/25 Skráseting av 19 havleiðingum í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 30/25 | 25/05864-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 115/25 | 25/05864-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 165/25 | 25/05864-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framløgd í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at filma og skráseta verandi 19 havleiðingar í Tórshavn.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri kanningararbeiðið er fyri ráðgeving og eftirlit.
Arbeiðið er boðið út, og eftirfylgjandi hevur umsitingin móttikið tilboð frá BioFar álj. Kr. 125.419,- (u/mvg).
Umframt hetta arbeiðið kann væntast aðrar ókendar útreiðslur.

Tíðarætlan: Kanningararbeiðið byrjar juni-juli 2025.

**Skjøl**
jnr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) |

| Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | | | Kanning av 19 havleiðingum | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 300.000,- av kto. 6875 Kloakkir LK 68999 Kloakkir (íløgur) fyri 2025 á nýggja verkætlan Skráseting av havleiðingum í Tórshavn til at filma og skráseta verandi 19 havleiðingar í Tórshavn og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 166/25 Kanning og støðumeting av 700 m havleiðingini við Landssjúkrahúsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 31/25 | 25/05865-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 116/25 | 25/05865-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 166/25 | 25/05865-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framløgd í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at kanna og filma havleiðing við landsjúkrahúsið.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri ráðgeving og kanningararbeiðið er mett til kr 500.000. Samskifti er við SJH Divers um kanningararbeiðið, vísandi til at hesir hava servitan innan økið.
Tíðarætlan: Anlægsarbeiðið byrjar í juni-juli 2025

Verður innkomið tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
jnr. 25/00417-1 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | Kanning av havleiðing við LSH | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 500.000,- av kto 6875 Kloakkir LK68999 Kloakkir (íløgur) fyri 2025 á kto 6875 nýggja verkætlan, Kanning av havleiðing við LSH, til at kanna og filma havleiðing við Landsjúkrahúsið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at arbeiðið verður boðið út.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 493<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 167/25 Kanning av verandi støðu á kloakkleiðing við Sjósavnið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 32/25 | 25/05866-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 117/25 | 25/05866-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 167/25 | 25/05866-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framløgd í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at kanna og gera fyrireikingararbeiði á landi við Sjósavnið.

Arbeiðið verður mett til at kosta 2 mió kr. Farið er undir fyrireikandi ráðgevingararbeiði á landi, og ætlanin er at fara undir útbjóðing skjótast til ber, so farast kann undir kloakkarbeiði á landi.

Tíðarætlan: Prosjektering juni-juli 2025. Anlægsarbeiðið byrjar í september 2025

Verða innkomnu tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
jnr. 25/00417-1 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nýggj havleiðing við Sjósavnið | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 2.000.000,- av kto 6875 Kloakkir LK68999 Kloakkir (íløgur) á kto 6875, Nýggj havleiðing við Sjósavnið, fyri 2025 til at kanna og gera fyrireikingararbeiði á landi við Sjósavnið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir viðtilmællinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 495 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

# 168/25 Skráseting og spuling av kloakkleiðingum í allari kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 33/25 | 25/05867-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 118/25 | 25/05867-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 168/25 | 25/05867-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framlagt í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at kanna, filma og spula kloakkleiðingar í allari kommununi.

Umsitingin er í samskifti við einasta veitara, sum hevur førleika til at gera slíkt serstakt arbeiði. Talan er um eitt afturvendandi arbeiði. Samlaða kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er mett til kr 700.000,-

Tíðarætlan: Framhaldandi kanningararbeiði byrjar í summarhálvuni 2025

**Skjøl**
jnr. 25/00417-1 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | Skráseting og spuling av kloakkleiðingum í allari kommununi | 700.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 700.000,- av kto 6875 Kloakkir (íløgur) LK68999 á nýggja verkætlan Skráseting og spuling av kloakkleiðingum í allari kommununi á somu kto fyri 2025 til at skráseta og spula kloakkleiðingar í kommununi og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 169/25 Kloakkarbeiði í Pedda við Stein gøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 34/25 | 25/05868-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 119/25 | 25/05868-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 169/25 | 25/05868-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framlagt í máli nr. 25/00417, og henda verkætlanin fevnir um at dagføra kloakkleiðingarnar í Pedda við Stein gøtu.

Fyribils metingar fyri kloakkarbeiðið er uml. 1,2 mió.
Tíðarætlan: Ætlanin er at fara undir prosjektering og útbjóðing í heyst.

Verða innkomnu tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
jnr. 25/00417 Íløgu- og rakstrarætlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | Kloakkleiðing í Pedda við Stein gøtu | 1.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 1.200.000,- av kto 6875 LK 68999 Kloakkir (íløgur), á nýggja verkætlan, Kloakkleiðing í Pedda við Stein gøtu, undir somu kto fyri 2025 til at fyrireika útbjóðingartilfar til kloakkarbeiði í Pedda við Stein gøtu og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, tó so at innkomnu tilboðini skulu leggjast aftur fyri fíggjarnevndina til endaliga støðutakan.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 499<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 170/25 Kloakkarbeiði á Heiðavegi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 35/25 | 25/05869-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 120/25 | 25/05869-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 170/25 | 25/05869-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framlagt í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um fyrireiking til kloakkarbeiði á Heiðavegi.

Fyribils metingar fyri prosjektering og kloakkarbeiðið er uml. 1,75 mió.
Tíðarætlan: Ætlanin er at fara undir prosjektering og útbjóðing seinni í ár.

Verða innkomnu tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
25/00417-1 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6875 | | | Kloakkarbeiði á Heiðavegi |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 1.750.000,- av kto 6875 Kloakkir (íløgur) LK68999 Kloakkir, á nýggja verkætlan, Kloakkarbeiði á Heiðavegi, undir somu kto. fyri 2025 til at fyrireika útbjóðingartilfar til kloakkarbeiði á Heiðavegi og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weye var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, tó so at innkomnu tilboðini skulu leggjast aftur fyri fíggjarnevndina til endaliga støðutakan

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

# 171/25 Hosufóðring av kloakkleiðingum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 36/25 | 25/05870-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 121/25 | 25/05870-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 171/25 | 25/05870-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framløgd í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstraræ tlan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um hosufóðring í kloakkleiðingum.

Talan er um eitt árligt afturvendandi anlægsarbeiði, sum byrjaði í 2021. Hetta tíðarskeiðið eru umleið 4,5 km av kloakkleiðingum dagførdir. Kostnaður fyri at dagføra kloakkleiðingar hetta tíðarskeiðið er umleið kr. 7 mió.

Tíðarætlan: Nakað av kanningararbeiðinum er gjørt, og kannað verður enn. Farið verður undir sjálva fóðringina mánaðarskiftið august / september 2025, og tekur arbeiðið einar 3-4 vikur.

**Skjøl**
Jnr. 25/00417-1 Íløgu- og rakstraræ tlan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | | 7.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 7.000.000,- av kto 6875 Kloakkir LK68999 Kloakkir (íløgur) fyri 2025 til verkætlan L68040, Hosufóðring av kloakkum, til hosufóðring av kloakkleiðingum í kommununi og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

Fíggjarnevndin 12. juni 2025:

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

# 172/25 Ymisk arbeiði á Brennistøðini í 2025 - fíggjað av løgukonto 7175 renovasjón

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 26/25 | 25/04246-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 74/25 | 25/04246-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 109/25 | 25/04246-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 172/25 | 25/04246-1 |

**Upprunin til málið**
Tað eru ymisk arbeiðir sum skulu gerast á Brennistøðini, sum ikki kunnu fíggjast av verandi rakstri og tí krevja tey eykajáttan.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fáa niðanfyri nevndu arbeiðir/veitingar fíggjaði av løgukonto 7175 Renovasjón, fyri árið 2025. Av tí at talan er um "smærri íløgur", verður søkt um at fáa løgujáttan flutta yvir á rakstur á konto 7110.

Á løgukontu 7175 eru játtaðar íalt kr. 13 mió. í 2025, umframt at kr. 2.159 mió. standa frá 2024, sum ikki eru brúktar.

Umsitingin mælir til, at játtaðar verða íalt kr. 1.845.000 av íløgukonto 7175 Renovasjón, at flyta yvir á rakstrarkonto 7110 Renovatión, at nýta soleiðis:

| | |
|---|---|
| Nýggjar bingjur | kr. 500.000 |
| Moldplássið í Havn | kr. 1.000.000 |
| Umskipa plássið á endurnýtsluni | kr. 345.000 |

*Ætlanin er eisini at fáa eina nýggja stýrisskipan til alt renovasjónsøki. Endamálið við skipanini er, at fáa betri fakturering, betri tænastur, hjálp til ruskinsavning og rottangatøming, umframt betri arbeiðsgongdir yvirhøvur, soleiðis at vit fara frá at alt er manuelt, til at alt verður automatiserað og kann tosa saman. Við nýggjari skipan, koma inntøkurnar eisini at vaksa, av tí at onki dettur niður ímillum.*

*Arbeitt verður víðari við hesum og tá vit kenna kostnaðin, verður málið lagt fyri nevnd.*

**Lógir, ásetingar**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sambært játtanarreglurnar hjá Tórshavnar kommunu, so skulu 2 viðgerðir í býráðnum til fyri at flyta millum íløgur og rakstur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Bingjur:
Ætlanin er at keypa 4-5 nýggjar bingjur.
Bingjurnar, sum ætlanin er at keypa, eru tvær spíssbingjur, at brúkta í Nólsoy, soleiðis at ruskbilurin kann tøma tær, tá hann er í Nólsoy eina ferð um vikuna. Tvær bingjur við lúkum, tað eru bingjurnar, sum eru á plássinum hjá okkum á Hjalla, hesar bingjur eru sera nógv slitnar. Og tvær opnar bingjur til timbur, hesar verða eisini brúktar á plássinum á Hjalla.

Moldplássið í Havn:
Kommunan hevur moldpláss í Húsahaga. Moldplássið liggur sunnan fyri vegin inn til Vatnverkið og tyrvingarplássið í Villingadali, sum ikki er í nýtslu meira.
Við tyrvingarplássið stendur ein gamal skúrur, innrættaður til skrivstovu og starvsfólkarúm, umframt ein høll til amboð. Skúrurin og høllin eru í so ringum standi, at hesi eiga at verða tikin niður og beind burtur. Tað ber ikki til at endurnýta skúrin og høllina við at flyta tey til eitt annað stað.
Nú øll tyrvingin er flutt til Kvívíkar, verður ikki meira tyrvt í Húsahaga, og tí er bert moldplássið eftir í rakstri, og tað liggur uml. 1,7 km. burtur frá verandi skúri, um koyrt verður eftir vegnum, ella 1 km. í beinari luftlinju.
Tað eru 2 gravimaskinur á staðnum og 2 mans arbeiða har, annar á moldplássinum og hin á tyrvingarplássinum, har plássið verður avriggað.
Neyðugt er at seta ein nýggjan skúr upp við moldplássið, sum inniheldur skrivstovu og starvsfólkarúm. Stoypast má eitt fundament, og leiðingar mugu leggjast til skúrin.

Umskipa pláss á endurnýtsluni:
Verandi endurnýtsla er ov lítil í mun til talið av borgarum/bilum, sum koma inn har. Serliga er tað nógv ferðsla leygardagar, tá tað koma upp til 1.500 bilar inn. Um summarið eru tað nógv, sum koma niðan við urtagarðsburturkasti (gras, greinar o.a.), og fleiri av hesum koma við viðfestivogni.
Sum er, fyllast bingjurnar til urtagarðsburturkast rættuliga skjótt, og plássið er soleiðis innrættað, at fólk sum koma inn við viðfestivogni, mugu bakka fyri at sleppa avstað aftur, og tað duga tey illa. Tí kemur ofta proppur í, og plássið fyllist við bilum.
Fyri at bøta um hetta, er ætlanin at gera eitt nýtt pláss til urtagarðsburturkast, sum tekur nógv meira, og har bilar við viðfestivogni sleppa til og frá undan at bakka (hjálagt er tekning).

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/03238-4 Tekning av plássi til urtagarðsburturkast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 7175 | LK71999 | Renovatión |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 7110 | | Renovatión | |

| Upphædd |
|---|
| 1.845.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 1.845.000 av íløgukonto 7175 Renovasjón, at flyta yvir á rakstrarkonto 7110 Renovatión og at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, tekur ikki undir við, at pengar verða fluttir av íløgum inn á rakstur.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá Náttúru- og umhvørvisnevndini, og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Birgir Nielsen.

# 173/25 Skansabryggjan útbygging - loka verkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 03.06.2025 | 26/25 | 25/05804-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 123/25 | 25/05804-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 173/25 | 25/05804-1 |

**Upprunin til málið**
Víðkan av Skansabryggjuni

**Lýsing av málinum**
Víðkanin av Skansabryggjuni er største verkætlanin hjá Tórshavnar kommunu nakrantíð, bæði í vavið og fíggjarliga. Verkætlanin er nú liðug, allar ósemjur greiddar, og verkætlanin er tískil klár at gerast upp fíggjarliga og lokast. Tó eru verkætlanirnar "Skipan av økinum" og "Molin – nýggj farstøð" framvegis í gongd, men hesar hava serstakar játtanir og koyra óheftar av hesi verkætlan.

Víðkanin av Skansabryggjuni fevndi í stuttum um

- At spreingja og flyta uml. 3,5 mió $m^3$ (innbygt mát) av Glyvursnesi inn til Skansabryggjuna.
- Umleið 1000 m av nýggjum brimgarði í upp til 10 m hædd
- Umleið 880 m av kajsíðu við 14/15 m dýpi, og 80 m við minni dýpi.
- Víðkað bryggjuøkið við umleið 94.100 $m^2$.
- Føra spillvatnsútleiðing frá Álakeri og uml 700 m út til endan á nýggja brimgarðinum.

Fyrireikingarnar byrjaðu av álvara í 2013, projekteringin byrjaði í 2014, og arbeiðið varð boðið út seint í 2015. Byggiarbeiðið byrjaði í 2016 og var endaliga liðugt í 2024.

Í talvuni niðanfyri er yvirlit yvir játtan og nýtslu.

| | | |
|---|---|---|
| **Játtan** | **545.365.000** | |
| Byggikostnaður | | -622.390.974 |
| Skaðaendurgjøld | | 75.540.494 |
| Inntøkur (søla) | | 1.000.000 |
| **Nýtsla** | **-545.850.479** | -545.850.479 |
| **Úrslit** | **-485.479** | |

Upprunaliga játtanin til verkætlanina var 475 mió kr, harav vóru 10 mió til projektering. Endaligi kostnaðin gjørdist 545,85 mió kr, ið er knapt 15 % omanfyri upprunaliga játtanina á 475 mió.
Viðmerkjast skal, at verkætlanin sum kunnugt hevur verið rakt av ymsum skaðum og avbjóðingum annars, sum bæði hava seinkað verkætlanini og viðført eyka útreiðslur. Talan er um skaða á akkerini undir bygging, skaða á brimgarðin av ódnarveðri, og tríggjar ásiglingar av skipum (Vantage og Svartfoss, ið viðførdu minni skaðar, og Tukuma Arctica, ið viðførdi størri skaða). Niðanfyri er talva, ið vísir verkætlanarroknskapin býttan sundur í fasurnar projektering, høvuðsprojekt og teir 3 stóru skaðarnar.

| | Játtan | Útreiðslur | Endurgjøld | Søla | Úrslit |
|---|---|---|---|---|---|
| Projektering | 10.000.000 | -8.589.486 | | | **1.410.514** |
| Høvuðsprojekt | 502.265.000 | -502.750.798 | | 1.000.000 | **514.202** |
| Skaði - akker | 33.100.000 | -89.156.127 | 58.870.569 | | **2.814.442** |
| Skaði T.A. | | -11.136.905 | 10.249.925 | | **-886.980** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skaði brimgarð | | -10.757.658 | 6.420.000 | | **-4.337.658** |
| **Í Alt** | **545.365.000** | **-622.390.974** | **75.540.494** | **1.000.000** | **-485.479** |

Samlaði kostnaðurin av teimum trimum skaðunum gjørdist uml 111 mió, meðan endurgjøldini fyri skaðarnar vóru 75,5 mió. Tað sæst í talvuni, at meðan nettokostnaðurin hjá Tórshavnar havn av T.A. skaðanum var uml 0,9 mió og av brimgarðsskaðanum umleið 4,3 mió kr., varð eingin eyka játtan givin til hesar báðar skaðarnar. Nettokostnaðurin av akkersskaðanum var umleið 30,3 mió kr, meðan eykajáttanin til hendan skaðan var 33,1 mió.
Skaðarnir ávirkaðu sostatt verkætlanina við 35,5 mió kr í alt. Sostatt kann sigast, at um hesir skaðar ikki vóru, hevði verkætlanarkostnaðurin verið uml. 510 mió kr, ið eru góð 7 % hægri enn upprunaliga játtanin. Eisini kann nevnast, at prísvøksturin (vegna inflatión) í verkætlanartíðini bleiv uml. 29 mió ella uml 15 mió meira enn tær 14,1 mió, sum avsettar vóru í upprunaligu játtanini frá 2016. Játtanin til prísvøkstur bleiv hækkað til 31,9 mió í 2019. Um hesar 15 mió í príssvøkstri ikki komu aftrat, hevði verkætlanarkostnaðurin verið uml. 495 mió, ið er 20 mió ella uml. 4 % hægri enn upprunaliga játtanin á 475 mió.

Víst verður annars til viðheft skjøl yvir nærri útgreiningar av játtan og verkætlanarroknskapinum.

Nevnast skal, at øll verkætlanin er fíggjað við egininntøkum hjá Tórshavnar havn umframt lántøku, ið Tórshavn havn rindar aftur yvir 15 ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sum ávíst í talvuni omanfyri, vísir verkætlanarroknskapurin eitt hall á 485.479 kr. Hóast tað, vísir játtanarskipanin hjá Tórshavnar kommunu/Tórshavnar havn hinvegin eitt avlop á 448.841 kr. Orsøkin til tað er helst, at til og við 2019 var skrásetingin í av løgujáttanini hjá Tórshavnar havn í fíggjarskipanini ikki býtt upp í ymsar verkætlanir við hvør sínum verkætlanarnummari, men var hinvegin ein samlað løgujáttan. Tí hevur "byrjanarupphæddin" í 2020 fyri hesa verkætlanina helst ikki verið heilt røtt, men tað hevur tó ikki eydnast at finna hendan feilin og tíansheldur at rætta hann.
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2025 vóru avsettar kr. 2.611.000, til at dekka eitt møguligt hall, um nøktandi semja ikki fekst í ávísum máli, har ið ósemja framvegis var, tá ið fíggjarætlanin varð gjørd á sumri í 2024.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/00896 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki
20/00429 Umvæling av Skansabryggjuni
25/01936 Brimskaði á grótkastið á Skansabryggjuni - 20/03313
21/01132 Tórshavnar havn Skaði á Skansabryggjuni í gerð
22/07361 Uppskot til semju við J. & K. Petersen um fíggjarliga uppgerð viðvíkjandi Skansabryggjuni.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.Nr. 25/05804-2 : Byggiroknskaparskjøl

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at verkætlanin "Víðkan av Skansabryggjuni" verður lokað, at avlopið í játtanarskipanina áljóðandi uml. 449.000 kr. umframt tær 2.611.000 kr, ið vóru avsettar á íløguætlanini fyri 2025, verða fluttar til íløgukarmin hjá Tórshavnar havn, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 03. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 509 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 174/25 Uppskot til reglugerð fyri útlutan av raðhúsum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 128/25 | 25/05453-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 174/25 | 25/05453-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við málið um útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.1, er samtykt, at Tórshavnar kommuna skal finna keyparaskaran og standa fyri útlutanini av raðhúsunum. Tí er neyðugt við eini reglugerð fyri, hvussu raðhús skulu lutast út.

**Lýsing av málinum**
Í stuttum er uppskotið til reglugerð líkt reglugerðini um útlutan av íbúðum. Fyrst verður kastað lut millum borgarar, sum ikki eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til bústað. Síðan verður kastað lut millum borgarar, sum bara eiga eina íbúð í Tórshavnar kommunu. Megnar kommunan ikki at útvega nokk av keyparum, verður loyvt byggiharranum sjálvum at selja raðhúsini í fríari sølu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/04036 Uppskot til reglugerð fyri útlutan av íbúðum
25/04323 Útstykking omanfyri Argjahamar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til reglugerð um útlutan av raðhúsum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin í Snarskivuni mæla til at tikið verður undir við hjálagda uppskoti um reglugerð.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Kári Johansen, atkvøður blankt.

Málið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

# 175/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 98/25 | 25/00161-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 130/25 | 25/00161-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 175/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 512<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Fremlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Framlagt og góðkent.

# 176/25 Nýtt felagshús til FC Hoyvík og heildarætlan fyri økið - 23/05602

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | | | 25/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 92/25 | 25/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 176/25 | 25/00153-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til ískoytissáttmálan millum TK og FC Hoyvík, har kommunan skal undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshús við Hoyvíksvøll.

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál nr. 18/00009 viðv. felagshúsi til FC Hoyvík, so endaði tað málið við samtykt um gera eina fyribils hølisloysn til fótbóltsfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF. Síðani eru fyribilslonirnar settar upp, og fótbóltsfeløgini, FC Hoyvík og Undrið FF, hava lagt saman undir felagsheitinum FC Hoyvík.

Fyribils lonin bleiv bleiv gjørd í 2022, men hendan loysnin hevur víst seg at vera alt annað enn góð. Fyri tað fyrsta, so er Lonin alt ov lítil til tað alsamt vaksandi virksemið hjá FC Hoyvík, og fyri tað næsta, so ber lonin í stóran mun brá av at vera ein fyribilsloysn. Stórar avbjóðingar hava verið og eru í løtuni. M.a. er lonin illa farin av veðrinum, og stórar avbjóðingar er við tí byggitekniska partinum.

Í samb. við mál 21/01797 (Yvirtøka av ognini hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum 8), bleiv tað samtykt, at TK keypir ognina hjá FC Hoyvík (fyrrverandi FRAM) fyri 636.000 kr.

Samstundis bleiv samtykt at gera ískoytissátmála, millum TK og FC Hoyvík, um at kommunan skal undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshús við Hoyvíksvøll innan 31. desember 2024.

Sbrt. ískoytissáttmálanum skal keypsupphæddin á 636.000 kr. brúkast til bygging av nýggjum felagshúsið, sbrt. vallarreglugerðini hjá FSF. Er TK ikki farið undir tær ítøkiligu fyrireikingarnar til at byggja felagshúsið, kann FC Hoyvík krevja at fáa upphæddina útgoldna í januar 2025.

FC Hoyvík hevur á fundi tann 2. mai 2024 boðað TK frá, hvørji ynskir felagið hevur í samband staðseting og tørv.

FC Hoyvík metir, at besta loysnin er at seta nýggja felagshúsið aftanfyri norðara málið. Við at staðseta húsið við norðara enda, fær TK eisini loyst avbjóðingina við, at grót ríður undan parkeringsplássinum hjá skúlanum og oman til vøllin.

Felagið metir, at tað gevur ikki meining at gera áskoðarapláss í hesum felagshúsinum, tí tað stendur aftanfyri annað málið. Heldur skulu áskoðaraplássini gerast á vestaru langsíðu mitt fyri.

FC Hoyvík hevur hugskotið, at húsið verður gjørt í trimum hæddum, har hædd er tikin fyri øllum teimum treytum sum FSF hevur í vallarreglugerðini. Ovasta hædd kundi partvíst verið brúkt til okkurt tilboð á skúla-ella barnagarðsøkinum.

FC Hoyvík boðaði frá, at felagið tulkar orðingina í § 2 í ískoytissáttmálanum “at kommuna er farin undir ítøkiligar fyrireikingar at byggja felagshúsið”, sum at TK setur upphædd av á fíggjarætlanini 2025 til endamálið. Harumframt vil felagið hava at vita hvat tíðarætlanin verður.

Eitt felagshús til FC Hoyvík hongur saman við heildarætlanini fyri bæði Karlamagnusarbreyt, skúlan við Løgmannabreyt og Hoyvík sum heild. Sostatt er felagshúsið hjá FC Hoyvík eisini bundin av teimum ætlanum, ið Býarskipanardeildin umsitur á økinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 514 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01797 Yvirtøka av ognini hjá FC Hoyvík á Gundadalsvegnum 8
18/00009 Fótbóltsfelagið FC Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/05602-2: Undirskrivaður sáttmáli og ískoytissáttmáli - Mál 21/01794

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Mentamálanevndin viðgerð málið og beinir tað víðari til Byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fundur var við umboð fyri FC Hoyvík, har umboðini greiddu frá teirra sjónarmiðum viðv. at fáa staðsett eitt felagshús. Fleiri staðsetingar vórðu umrøddar, men vísti felagið á staðsetingina fyri endan á vøllinum, niðan móti skúlanum við Løgmannabreyt, sum bestu staðseting, sí kort sum sýnir økið, j.nr. 23/05602-6.

Fleiri grundgevingar eru fyri, hví júst henda staðsetingin er góð, og serliga varð víst á, at hetta lendið treingir til at verða bøtt, tí at tað er bratt, og grót rapar niður – so statt er verandi støða ikki trygg. Umsitingin tekur undir við, at økið eigur at verða gjørt, og tískil hevði henda staðsetingin gagnað økinum væl.

Somuleiðis varð prátað um, at henda staðsetingin fyri endan á vøllinum hevði gjørt atkomuna til vøllin og økið í síni heild betri skipað umvegis parkeringsøkið hjá Skúlanum.

Skúlin varðar av økinum, har parkeringsplássini eru, og við hesi staðseting, verða tað nøkur parkeringspláss, sum verða burturbeind. FC Hoyvík hevur verið á fundi við skúlan og frítíðarskúlan, og taka báðir partar undir við ætlaðu staðsetingini – hetta er skrivliga váttað.

<u>Meiri enn eitt felagshús til FC Hoyvík</u>:
FC Hoyvík vísir somuleiðis á, at tey ynskja, at felagshúsið umframt at vera til virksemið kring fótbóltin kann gerast eitt býlingshús til grannalagið – og harvið savna grannalagið til annað enn fótbólt.

Møguliga kann hugsast at húsið somuleiðis kann brúkast til skúla- og frítíðarskúlavirksemi.
<u>Heildarætlan fyri økið</u>:
Á fundinum við FC Hoyvík varð somuleiðis víst á, at har verandi lonir standa, eigur at verða gjørt møguligt at hava nakrar smærri fótbóltsvøllir.

Eisini varð víst á ynski um at gera økið út móti Karlamagnussarbreyt í sunnara enda til eitt spæliøki – sum kemur øllum borgarum til gagns.

Á vestaru síðuni meintu fundarluttakararnir, at man eigur at gera áskoðaramøguleikar.

Neyðugt er við eini samlaðari heildarætlan fyri økið, og eigur henda at verða gjørd sum skjótast. Tað skal tó ikki skiljast soleiðis, at manglandi heildarætlanin fyri økið skal steðga bygging av felagshúsi til felagið.

<u>Byggingin</u>:
Av tí at umstøðurnar hjá felagnum ikki eru nøktandi, og limatalið veksur heilt skjótt, er ynskiligt, at felagshúsið verður sett á breddan sum skjótast.

FC Hoyvík ynskir, at tað verður kommunan, sum kemur at standa fyri byggingini.

Felagið vísti á nakrar byrjanarskitsur av felagshúsinum, har innrættingin er víst. Sí viðhefta skjal, j.nr. 23/05602-4.

Fyri at fáa arbeiðið sett í gongd sum skjótast, so er upplagt at seta gongd á prosjekteringina av húsinum og lendisviðurskiftunum. Og tískil verður neyðugt við eini játtan til at seta prosjekteringina í gongd.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57043 | Nýggj ljósskipan á Tórsvølli | 5775 | | | FC Hoyvík - Felagshús | 250.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 250.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |

| | Býráðsfundur<br>18. juni 2025 | Blað nr.: 516 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |
|---|---|---|

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðarin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta eitt komandi felagshús hjá FC Hoyvík fyri endan á vøllinum, eins og skjal nr. 23/05602-4 vísir.
- at arbeitt verður víðari við planleggingini av økinum, og at prosjekteringin av felagshúsinum verður boðin út og sett í verk
- at játtaðar verða kr. 250.000 av kt 5775, L57043, Nýggj ljósskipan á Tórsvølli á nýggja verkætlan undir kt 5775 við heitinum FC Hoyvík - Felagshús
- at málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. juni 2024**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 20. juni 2024**: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 400.000 av kt. 5775, L57043, Nýggj ljósskipan á Tórsvølli á nýgja verkætlan undir kt 5775 við heitinum FC Hoyvík – Felagshús.

Málið beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2024**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti 24. oktober 2024**
Sáttmáli er undirskrivaður við ráðgevandi fyritøku um heildarætlan fyri stadionøkið og nýtt felagshús v.m.

Saman við ráðgevandi arkitektum, hevur umsitingin verið kring landið og hugt eftir, hvussu aðrar kommunur hava skipað felagshús við fótbóltsvallir. Hugt hevur serliga verið eftir teimum nýggjastu felagshúsunum í Føroyum.

Við hesum sum útgangsstøði og í teimum hugskotum sum FC Hoyvík hevur framlagt, verður framløga um hugskot til nýtt felagshús á komandi fundi í Mentamálanevndini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at mentamálanevndin tekur støðu til hvønn leist málið skal koyra víðari upp á, og at nýtt felagshús til FC Hoyvík kemur við í fíggjarætlanararbeiðið fyri komandi ár.

**Mentamálanevndin 30. oktober 2024**: Umrøtt.

**Ískoyti:**
Birgir Nielsen biður um at fáa málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Málið varð umrøtt, og síðani varð atkvøtt um, hvørt broytingaruppskot skuldi kunna leggjast fram í málinum, og fall hetta við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Málið avgreitt við umrøðuni í býráðnum.

**Ískoyti:**
Birgir Nielsen krevur at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Málið varð umrøtt, og síðani varð atkvøtt um, hvørt broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson um at bjóða lendisarbeiðið út skuldi kunna leggjast fram í málinum, og fall hetta við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum fyri og ongari blankara.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Málið endaði tí við umrøðuni í býráðnum.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen | Bergur Robert Dam Jensen |
| Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Birgir Nielsen | Astrið Breckmann |
| | Hildur Eyðunsdóttir | |